# Glæmur

Brot úr skriftum eftir Bahá'u'lláh

**INNGANGUR**

Tann tíðin, ið var fyrijáttað fólkasløgum og ættum jarðarinnar, er nú komin. Lyfti Guðs, soleiðis sum tey eru skrivaði niður í teimum heilugu bókunum, eru øll fullgjørd. Úr Zion er gingin út lóg Guðs, og Jerusalem, heyggirnir og landið, eru fylt við dýrdini av opinbering Hansara.

Høvundurin til hesi stórfingnu orð var ein maður, ið sat sum innilæstur fangi í tí herviliga fongsulsbýnum Akká í tí Heilaga Landinum. Maðurin, sum livdi í nítjandu øld, var av hábornari persiskari ætt, men hevði meginpartin av lívi sínum verið í tvungnari útlegd í ymsum pørtum av tí táverandi turkiska stórveldinum. Navn hansara var Bahá´u´lláh, ið orðarætt merkir Dýrd Guðs, og orsøkin til hansara fongsling og útlegd var tað, at hann var ein framúrskarandi viðhaldsmaður hjá einari nógv umstríddari, nýggjari trúarrørslu.

Hendan rørslan hevði heilt knappliga, í árinum 1844, tikið seg upp í Persiu ( Iran ), tá ið ein ungur keypmaður úr býnum Shiráz var stigin fram og hevði sagt seg vera Boðbera frá Guði við einum stórtíðindum at bera heiminum. Dagur Guðs, sum spáddur var um í teimum halgu skriftunum, var upprunnin, kunngjørdi unglingin: Skjótt fór ein Mikil Boðberi frá Guði at geva seg til kennar millum menniskjuni; Ein, ið fór at endurnýggja heimin og blása nýtt lív í allar hansara skapningar. Unglingin gav sær sjálvum tilnavnið Báburin, ið merkir Portrið, og segði sína uppgávu vera at greiða vegin fyri hesum komandi Boðbera.

Boðskapurin hjá Bábinum hevði beinanvegin fingið stóra undirtøku millum fólk um alt Iran, og hetta hevði órógvað landsins trúarligu og verðsligu leiðarar í tann mun, at teir høvdu stílað fyri einari forfylging ímóti honum, ið var so ógvuslig og so rá, at hon neyvan hevur sín líka í heimssøguni. Viðhaldsfólk í túsundatali vórðu pínd og dripin á ræðuligasta hátt, og Báburin sjálvur varð avrættaður frammanfyri einari stórari mannamúgvu, ákærdur fyri gudsspottan. Bahá´u´lláh varð, sum áður nevnt, fongslaður og koyrdur í útlegd; fyrst til Baghdad í Irak, síðani til Konstantinopel og Adrianopel í Turkalandi og loksins til Akká í táverandi Palestina. Alla hesa tíðina, í meira enn fírati ár tilsamans, livdi hann undir teimum ringastu og mest mannminkandi umstøðunum, ið hugsast kundu. Men Bahá´u´lláh kundu hesir leiðarir kortini ikki basa, hvussu teir so royndu. Hann hevði eitt Krav at seta fram - tað størsta Kravið av øllum.

Bahá´u´lláh segði seg vera tann Boðberan frá Guði, ið Báburin hevði tosað um; Hann, ið hevði verið lovaður heiminum í øllum teimum heilugu skriftunum, líka úr fyrndartíð, og sum fylgismennirnir hjá øllum átrúnaðum heimsins bíðaðu eftir. Hetta var hin evsti Dagurin, segði hann, sum profetar og boðberar Guðs høvdu talað um; tá ið øll fólkasløg, og allar tjóðir og trúgvir jarðarinnar skuldu sameinast, og menniskjuni fóru at verða leidd til alt tað, sum gott og heilagt er. Hann kunngjørdi, at heimurin, soleiðis sum menniskjuni høvdu kent hann í túsundtals ár, var komin at enda, og at ein nýggjur og betri heimur fór at koma í hansara stað. Skjótt skuldu menniskjuni gerast vitni til stórar samfelagsligar rembingar, fordømisleysa tøknifrøðiliga framgongd, og eisini tær ræðuligastu vanlukkur, so hvørt sum tann gamla heimsskipanin fór undir kav og tann nýggja kom undan.

Úr fongsulskliva sínum skrivaði Bahá´u´lláh til kongar, stjórnarmenn og trúarleiðarar heimsins, og boðaði teimum frá kalli sínum, og hann álegði teimum at vera nýggja boðskapi Guðs lýdnir. Hann heitti á teir um at stýra við vísdómi og rættvísi, og hann læt teir vita, at hin mest átrokandi tørvurin hjá heiminum á hesum Degi var, at teir, ístaðin fyri bert at nøra at sær og sínum, komu saman til tess at arbeiða fyri felags áhugamálunum hjá allari mannaættini.

Kallið hjá sær, segði Bahá´u´lláh, var at vegleiða menniskjuni aftur til Guðs og at útgreina tær lærur og fyriskipanir, ið skuldu uppala mannaættina andaliga og skapa ein heim, ið tryggjaði trivnaðin hjá øllum sínum fólkum og tjóðum. Hesar lærur og fyriskipanir innibera m.a. stovnanina av einum heimssamveldi við einum felags gjaldoyra og einum altjóða tungumáli; javnrættindi millum kynini og skúlagongd fyri øll. Bahá´u´lláh forbjóðar partapolitikki, rúsevnisnýtslu og baktalu; hann eggjar tann einstaka til at vera sannleikasøkjandi og til at lata rættvísi og kærleika til alla mannaættina eyðkenna sítt lívslag og sín hugsanarhátt.

Bahá´u´lláh lærir, at tað bert er ein Guð til, og at allir heimsins átrúnaðir hava teirra uppruna í Honum. Allir hesir átrúnaðir hava í hvør sínum lagi havt tey somu endamálini, at vísa menniskjunum vegin til Harra teirra, at læra tey at liva saman í sátt og semju og at fyrireika tey til lívið aftaná hetta. Eisini hava teir allir givið lyfti um eitt Stórmenni, ið skuldi koma á heimsins evsta degi og savna Guðs fólk saman í eitt heimsumfevnandi brøðralag. Hetta er tað lyftið, ið Bahá´u´lláh sigur seg hava fullgjørt við sínari Opinbering, og hann áleggur øllum at leggja gomlu fordómar og pátrúgvir sínar til viks og at meta øll menniskju sum íbúgvar í sama landi og tegnar hjá sama Guði, tí at hetta er tann Nýggi Dagurin. Sjálvur sigur hann:

O tit høgt elskaðu! Eindarinnar tjaldtempul er reist; lítið ikki at hvørjum øðrum sum ókunnufólk. Tit eru fruktirnar av einum træi, og bløðini av einari grein.

Skriftirnar eftir Bahá´u´lláh, ið telja okkurt um hundrað bind tilsamans, eru í dag grundarlagið undir heimsins yngsta átrúnaði, Bahá´í Trúnni; ein trúgv, hvørs viðhaldsfólk framvegis verða illa forfylgd í Iran, men sum hevur megnað at rokkið nærum hvønn einasta krók á jørðini við sínum boðskapi. Tey skriftbrotini, ið eru tikin við í hesari bók, áttu - hóast avmarkaði í vavi - at givið tí spyrjandi ein breiðan kennskap til innihaldið í hesum boðskapi, ið longu hevur nógv ár á baki og sum stórliga tráar eftir at verða givin gætur.

(Introduction and translation by: Kristin Nielsen)

**Glæmur**
Brot úr skriftum eftir Bahá'u'lláh

1.

Byrjanin til alt er kunnleikin um Guð, og endin á øllum er fullkomið lýdni móti øllum tí, sum er sent niður av himni hins guddómliga vilja, ið gjøgnumseyrar alt, sum er í himlunum, og alt, sum er á foldum.

2.

Opinberingin, sum frá fyrndartíð hevur verið fagnað sum endamálið og lyftið hjá øllum profetum Guðs, og sum tann hægst virðismetta tráanin hjá boðberum Hansara, er nú, gjøgnum algongda vilja hins almáttuga og eftir ósigrandi boðum Hansara, opinberað fyri menniskjum. Koman av slíkari opinbering er fyriboðað í øllum teimum heilugu bókunum. Síggið hvussu mannaættin er vilst av gøtu síni, og hevur stongt seg sjálva úti frá dýrd síni, hóast hon fekk eina slíka kunngerð.

Sigið: O tit, sum elska hin eina sanna Guð! Strembið fram ímóti, at tit veruliga kunnu komast við og kenna Hann, og sømiliga virða fyriskipanir Hansara. Hetta er ein opinbering, sum ber tað í sær, at, um ein maður fyri hennara sakir letur ein einstakan dropa av egnum blóði renna, skulu óteljandi høv vera afturløning hansara. Ansið tykkum, O vinir, at tit ikki søpla burtur eina so ómetandi góðgerð, ella lítisvirða hennara loynda støði. Hugsið um ta mongd av lívum, ið eru vorðin, og framvegis verða offraði í einum heimi, sum er lumpaður av eini berari gyklmynd, ið fáfongda hugflogið hjá fólkum hansara hevur íspunnið. Veitið Guði tøkk, við tað at tit eru nádd fram at hjartans trá tykkara, og eru vorðin sameind við Hann, sum er fyrijáttan alra tjóða. Verjið tit, við hjálp hins eina sanna Guðs - upphevjað veri dýrd Hansara - fullkomileikan, sum býr í hesum støði, sum tit hava rokkið, og haldið fast við tað, ið skal fremja Hansara søk. Hann áleggur tykkum, sanniliga, tað ið er rætt, og sum stuðlar uppundir upphevjanina av støði menniskjunnar. Heiðraður veri hin almiskunnsami, opinberarin av hesari undursomu talvu.

3.

Hetta er dagurin, tá ið Guðs mest framúrskarandi góðvildir eru floymdar út yvir menniskjuni, dagurin, tá ið Hansara mest máttmikla náði hevur fylt allar skaptar lutir. Tað hvílir á øllum heimsins fólkasløgum at sættast um tað, sum skilir tey, og, í fullkomnari eind og friði, at dvølja í skugganum undir Hansara træi av umsorgan og miskunn. Tað sømir seg teimum, at halda fast við alt tað, sum, á hesum degi, fer at elva til, at tey hevja seg upp á eitt hægri støði, og sum fremur vælferð teirra. Sæl eru tey, ið hin alljómandi pennurin varð rørdur at minnast, og vælsignaði eru tey, hvørs nøvn Vit, vegna órannsakandi fyriskipan Okkara, hava valt at dylja.

Bønið tit hin eina sanna Guð um, at øll náðiliga mega verða stuðlaði til at fremja tað, ið verður góðtikið í eygum Okkara. Skjótt fer tann verandi skipanin at verða rikin upp, og ein nýggj breidd út í hennara stað. Sanniliga, Harri tín sigur sannleikan, og Hann er vitandi um tað ósædda.

4.

Hetta er dagurin, tá ið havið av Guðs miskunn er opinberað menniskjum, dagurin, tá ið morgunstjørnan av kærleika Hansara hevur lýst ljóma sín á tey, dagurin, tá ið skýggini av Hansara gávumildu vælvild hava skuggað fyri allari mannaættini. Nú er tað stund til at gleða og stimbra tey hugtungu við styrkjandi loti kærleikans og vinalagsins, og við livandi vatninum av hjálpsemi og vælgerðum.

Tey, ið eru Guðs elskaðu, hvar tey so savnast og hvørjum tey so møta, mugu sýna slíka eyðmýkt og slíkt lýdni, í teirra støðu til Guð, og í háttinum, sum tey hátíðarhalda lovprísan og dýrd Hansara, at hvørt einasta atom í dustinum undir fótum teirra kann vitna um dýpdina í teirra trúfesti. Samrøðan, sum fer fram millum hesar heilugu sálir, skal vera fylt við slíkari megi, at hesi somu atom av dusti skulu skelva av hennara ávirkan. Tey skulu bera seg at á ein slíkan hátt, at jørðin, sum tey traðka á, ongantíð skal fáa loyvi at tala til tey orð sum hesi: "Eg skal takast framum tykkum. Tí síggið hvussu tolin eg beri ta byrðu, ið bóndin leggur á meg. Eg eri tað tólið, ið áhaldandi tillutar øllum verum tær signingar, sum Hann, ið er keldan til alla náði, hevur litið mær upp í hendur. Hóast tann heiður, ið er givin mær, og tey óteljandi prógvini um mítt ríkidømi - eitt ríkidømi, ið nøktar tørvin hjá øllum heiminum - gevið gætur hvussu stór mín eyðmýkt er. Síggið, hvussu eg við avgjørdum lýdni lati meg verða niðurtraðkaða undir fótum menniskjunnar..."

Sýnið tolsemi og vælvild og kærleika mótvegis hvørjum øðrum. Skuldi nakar tykkara millum ikki verið førur fyri at skilt ein ávísan sannleika, ella stríðst fyri at fata hann, vísið fram, tá ið tit tosa við hann, ein anda av ómetaligum blíðskapi og góðvild. Hjálpið honum at síggja og viðurkenna sannleikan, uttan at meta tykkum sjálvi at vera, á nakran hátt, omanfyri hann, ella at hava betri gávur.

Øll skylda menniskjunnar á hesum degi, er at ogna sær tann partin av tí náðiflóð, ið Guð letur regna niður á hana. Lat ongan, tess vegna, hugsa um stórleikan ella lítilleikan hjá ílatinum. Skamturin hjá summum kann liggja í lógvanum hjá einum manni, skamturin hjá øðrum kann fylla eitt bikar, og hjá øðrum eitt heilt gallonmál.

Hvørt eyga eigur, á hesum degi, at sóknast eftir tí, sum best fremur søk Guðs. Hann, ið er hin ævigi sannleikin, beri Mær vitnisburð! Einki kann, á hesum degi, volda hesari søk størri mein enn ósemja og klandur, træta, mislag og kuldi millum Guðs elskaðu. Sleppið tykkum undan teimum, við megi Guðs og máttmikla stuðuli Hansara, og strembið tit eftir at knýta saman mannahjørtuni, í navni Hansara, sameinarans, hins alvitandi, hins alvísa.

Bønið tit hin eina sanna Guð um, at loyva, at tit kunnu njóta smakkin av slíkum gerðum, ið eru útinntar á gøtu Hansara, og fáa lut í søtleikanum av slíkum lítillætni og lýdni, sum sýnd eru fyri Hansara sakir. Gloymið tykkum sjálvi, og vendið eygu tykkara móti næsta tykkara. Leggið alla orku tykkara í tað, ið kann fremja uppaling menniskjunnar. Einki er, ella kann nakrantíð vera, fjalt fyri Guði. Um tit fylgja leið Hansara, fara óteljandi og ófarandi vælsignilsi Hansara at regna niður yvir tykkum. Hetta er tann strálandi talvan, hvørs vers eru streymaði frá penni Hansara, ið er Harrin yvir øllum heimum. Grundið yvir hana í hjørtum tykkara, og verið tit av teimum, ið geva fyriskipanum hennara gætur.

5.

Tann tíðin, ið frammanundan var avgjørd fyri fólkasløgum og ættum jarðarinnar, er nú komin. Lyfti Guðs, soleiðis sum tey eru skrivaði niður í teimum heilugu bókunum, eru øll fullgjørd. Úr Zion er gingin út lóg Guðs, og Jerusalem, heyggjarnir og landið, eru fylt við dýrdini av opinbering Hansara. Sælur er tann, sum grundar í hjarta sínum yvir tað, ið er opinberað í bókum Guðs, hjálpini í neyðini, hinum sjálvuppihaldandi. Hugsið djúpt um hetta, O tit elskaðu Guðs, og latið oyru tykkara geva orði Hansara gætur, so at tit, vegna náði og miskunn Hansara, kunnu drekka ríviliga av krystallklára vatni trúfestis, og gerast líka støðuføst og óvikandi sum fjallið í søk Hansara.

Í bók Jesajasar stendur skrivað: "Far inn í klettin, og fjal teg í dustinum, av ótta fyri Harranum, og fyri dýrd hátignar Hansara." Ongum, ið grundar yvir hetta vers, fer tað at miseydnast at viðurkenna stórleikan í hesari søk, og ongin fer at ivast í upphevjaða sermerkinum hjá hesum degi - degnum hjá Guði sjálvum. Hetta sama vers verður fylgt av hesum orðum: "Og Harrin einsamallur skal verða upphevjaður á tí degi." Hetta er dagurin, ið pennur hins allarhægsta hevur heiðrað í øllum teimum heilugu bókunum. Tað er einki vers í teimum, sum ikki váttar dýrdina í Hansara heilaga navni, og eingin bók, ið ikki vitnar um tignina hjá hesum mest upphevjaða evni. Um Vit skuldu umrøtt alt, sum er opinberað í hesum himmalsku bókum og heilugu skriftum í sambandi við hesa opinbering, hevði hendan talva fingið ómetaligt vav. Á hesum degi, hvílir tað á einum og hvørjum, at leggja alt sítt álit á margfaldu gávur Guðs, og at reisast fyri at breiða sannleikarnar í søk Hansara út, við størsta vísdómi. Tá, og bert tá, fer øll jørðin at verða hyld av morgunljósinum frá opinbering Hansara.

6.

Hugsið um tað farna. Hvussu mong, bæði høg og lág, hava, til allar tíðir, langtandi bíðað eftir komuni av birtingum Guðs í halgaðu likamunum hjá hansara útvaldu. Hvussu ofta hava tey væntað komu Hansara, hvussu títt hava tey biðið fyri, at lotið av guddómligari miskunn skuldi blása, og hin fyrijáttaði fagurleikin stigið fram undan sløri loyndarinnar, og verið gjørdur sjónligur fyri øllum heiminum. Og hvørja ferð, tá ið so náðidyrnar lótust upp, og skýggini av guddómligum gávumildi regnaðu niður yvir mannaættina, og ljós hins ósædda skein omanfyri havsbrúnni av himmalskum veldi, avnoktaðu tey Hann øll, og vendu sær burtur frá andliti Hansara - andlitinum á Guði sjálvum....

7.

Hugsið um tey farnu ættarliðini. Síggið hvussu fólkið á Hansara degi, hvørja ferð morgunstjørnan av guddómligum gávumildi hevur lýst opinberingarljós Hansara á heimin, hevur reist seg ímóti Honum, og avnoktað sannleika Hansara. Teir, ið vórðu roknaðir at vera leiðarar menniskjunnar, hava uttan íhald roynt at forðað fylgisneytum sínum í, at venda sær til Hansara, sum er Guðs hav av markleysum gávumildi.

Eygleiðið hvussu fólkið, sum úrslit av tí dómi, sum teir prestlærdu í Hansara øld hava felt, hevur kastað Ábraham, vin Guðs, á bálið; hvussu Móses, hann sum talaði við hin almáttuga, varð fordømdur sum ein lygnari og bakbítur. Hugsið um hvussu Jesus, andi Guðs, hóast Hann var ómetaliga spaklyntur og fullkomiliga hjartagóður, varð viðfarin av fíggindum sínum. So ágangandi var mótstøðan, ið Hann, kjarni verunnar og Harri yvir tí sjónliga og tí ósjónliga, mátti møta, at Hann einki stað hevði at leggja høvur sítt. Hann reikaði áhaldandi úr einum staði í annað, sýttur nakran fastan bústað. Grundið yvir tað, ið rakti Muhammad, profetanna innsigli, mátti lívið hjá øllum øðrum verið eitt offur til Hansara. Hvussu ræðuligar tær plágur, ið leiðarar jødafólksins og avguðatilbiðjararnir lótu regna niður yvir Hann, sum er hægsti Harri alra, sum avleiðing av kunngerð Hansara um eind Guðs og um sannleikan í boðskapi Hansara! Við rættferðina í søk

Mínari! Pennur Mín suffar, og allir skaptir lutir gráta sáran, orsakað av teimum sorgum, ið Honum vóru fyri av teimum, ið hava brotið sáttmála Guðs, svikið testamenti Hansara, vrakað prógv Hansara og stríðst ímóti teknum Hansara. Soleiðis greiða Vit tær frá søguni um tað, sum er hent í farnum døgum. Kanska tú fatar.

Tú hevur hoyrt hvussu illa profetar Guðs, Hansara boðberar og útvaldu eru vorðnir plágaðir. Grunda eina løtu um hvat, ið búði undir, og hvør ið orsøkin var til eina slíka forfylging. Á ongum sinni, í ongari trúarskipan, eru profetar Guðs slopnir undan spottanini hjá fíggindum sínum, grimdarhuganum hjá kúgarum teirra, fordømingini hjá teimum lærdu í øld teirra, ið vóru ílatnir dularbúna rættlætisins og guðsóttans. Dag og nátt liðu teir slíka kvøl, ið eingin nakrantíð kann máta, uttan kunnleiki hins eina sanna Guðs, upphevjað veri dýrd Hansara.

Hugsa um henda misbjóðaða. Sjálvt um tey greiðastu prógvini staðfesta sannleikan í søk Hansara; sjálvt um spádómarnir, sum Hann, í týðiligari talu, er komin við, eru gingnir út; sjálvt um Hann, hóast Hann ikki verður taldur millum teir lærdu, er ólærdur og óroyndur í teimum dagligu orðadráttunum hjá teimum prestlærdu, hevur latið regna niður yvir menniskjuni flóð av sínum margfalda og guddómliga innblásta kunnleika; kortini, hygg hvussu hetta ættarliðið hevur vrakað ræði Hansara, og gjørt uppreistur ímóti Honum! Hann er, meginpartin av lívi sínum, vorðin hart royndur í klørnum á fíggindum sínum. Líðingar Hansara hava nú rokkið hámarkinum í hesum nívandi fongsli, sum kúgarar Hansara so órættvíst hava tveitt Hann í. Guð gævi, at tú, við einari gjøgnumgatandi sjón og einum geislandi hjarta, gevur tí gætur, sum er farið fram og sum fer fram nú, og, grundandi yvir hetta í hjarta tínum, megnar at ásanna tað, sum tey flestu, á hesum degi, ikki hava fatað. Guð gævi, at Hann ger teg føran fyri, at anda í teg søta angan av degi sínum, at njóta av markleysu náðistreymum sínum, at drekka ríviliga, við miskunnsomu vælvild Hansara, av tí størsta havinum, ið aldar á hesum degi í navni fyrndarkongsins, og at verða verandi fastur og óvikandi sum fjallið í søk Hansara.

Sig: Dýrd veri Tær, sum hevur fingið øll tey heilagu at játta sítt hjálparloysi frammanfyri teimum margfaldu opinberingunum av mátti Tínum og hvønn profet at viðurkenna sín einkisleika við glampan av Tíni varandi dýrd. Eg bøni Teg, við navn Títt, sum hevur latið upp portur himmalsins og fylt herskaran í tí høga við sælu, um at gera meg føran fyri at tæna Tær, á hesum degi, og at styrkja meg til at hava fyri eyga tað, ið Tú fyriskrivaði í bók Tínari. Tú veitst, O Harri mín, hvat er í mær; men eg veit ikki, hvat er í Tær. Tú ert tann alvitandi, tann alupplýsti.

8.

Ansið tykkum, O tit, sum trúgva á eind Guðs, at tit ikki verða freistaði at skilja ímillum nakrar av birtingunum av søk Hansara, ella at gera mismun á teknunum, ið eru fylgd við og hava váttað opinbering teirra. Hetta er vissuliga tann sanni týdningurin av guddómligari eind, um tit eru av teimum, ið fata og trúgva hesum sannleika. Verið tit harumframt vís í, at gerðirnar og verkini hjá hvørjari tí einastu av hesum birtingum Guðs, ja, enntá alt, sum hevur samband við tær, og hvat tær so mega fáa fram í ljósmála í framtíðini, er alt fyriskipað av Guði, og er ein spegilsmynd av vilja og ætlan Hansara. Hvør tann, ið ger bara tann allarminsta munin á persónum teirra, orðum teirra, boðskapum teirra, verkum og atburðum teirra, hevur vissuliga ikki trúð á Guð, men hevur avnoktað tekin Hansara, og svikið søkina hjá Hansara boðberum.

9.

Lovprísað veri eind Guðs, og allur heiður veri Hansara, sum er hin hægsti Harrin, hin ósamanberiligi og aldýrdarríki stjórnari alheimsins, sum, burtur úr berum einkisleika, hevur skapað veruleikan hjá øllum lutum, sum, burtur úr ongum, hevur íbirt tey fínastu og nettligastu evnini í

skapanarverki sínum, og, sum hevur bjargað skapningum sínum undan eyðmýking fjarleikans og vandunum fyri endaligari oyðing, við tað, at Hann hevur tikið teir inn í sítt kongsríki av óspillandi dýrd. Einki minni enn altfevnandi miskunn Hansara, altfyllandi náði Hansara, kundi nakrantíð útinnt tað. Hvussu kundi tað annars verið gjørligt hjá berum einkisleika, sjálvum at ognað sær tignina og førleikan at hevja seg úr stigi ikki-verunnar og upp í ríki verunnar?

Aftaná at hava skapað heimin og alt, sum livir og rørist í honum, valdi Hann, gjøgnum beinleiðis virki óavmarkaða og máttmikla vilja síns, at geva menniskjunum heiðurin og førleikan at kenna Seg og at elska Seg - ein førleiki, ið avgjørt má roknast at vera elvandi innskotið og fremsta ætlanin, ið liggja undir allari skapanini.... Á innasta veruleikan hjá hvørjum einasta skaptum luti hevur Hann kastað ljósið frá einum av nøvnum sínum, og gjørt hann at taka ímóti dýrdini hjá einum av sínum eginleikum. Á veruleika menniskjans hevur Hann tó savnað ljóman av øllum sínum nøvnum og eginleikum, og gjørt hann til eina spegilsmynd av sjálvum Sær.

Einsamøll av øllum skaptum lutum er menniskjan útvald til eina so stóra vælvild, eina so varandi gávu.

10.

Skoða við innara eyga tínum røðina av framhaldandi opinberingum, ið hava bundið saman birting Ádams við tí hjá Bábinum. Eg vitni fyri Guði, at hvør tann einasta av hesum birtingum er send niður gjøgnum virkið hjá guddómliga viljanum og ætlanini, at hvør teirra hevur borið ein serstakan boðskap, at hvørjari teirra er litin upp í hendur ein guddómliga opinberað bók, og at hvørjari teirra er vorðið heimilað at avdúka loynidómarnar hjá einari máttmiklari talvu. Mátið á tí opinbering, ið hvør teirra er sett í samband við, var endaliga avgjørt frammanundan. Hetta er, sanniliga, eitt tekin um vælvild Okkara mótvegis teimum, um tit eru av teimum, ið fata hendan sannleika....

11.

Tað, ið tú hevur hoyrt viðvíkjandi Ábrahami, vini hins almiskunnsama, er sannleikin, og eingin ivi er um tað. Rødd Guðs gav Honum boð um, at bera fram Ísmael sum offur, so at fastleiki Hansara í trúgv Guðs og skilnaður Hansara frá øllum øðrum uttan Honum, kundu verða prógvað fyri menniskjunum. Ætlan Guðs var, harumframt, at offra hann sum loysigjald fyri syndirnar og misgerðirnar hjá øllum heimsins fólkasløgum. Hendan sama heiður bønaði Jesus, sonur Mariu, hin eina sanna Guð, upphevjað veri navn og dýrd Hansara, um at veita sær. Av somu orsøk varð Husayn borin fram sum offur av Muhammadi, ápostli Guðs.

Eingin kann nakrantíð siga seg at hava skilt veruna hjá loyndu og margfaldu miskunn Guðs; ongin kann fata altfevnandi náði Hansara. Soleiðis hava treiskni menniskjunnar og misgerðir teirra verið, so ræðuligar hava tær plágur verið, ið hava rakt profetar Guðs og teirra útvaldu, at øll mannaættin hevur uppiborið at verða pínd, og at glatast. Loynda og eymasta forsjón Guðs hevur kortini, gjøgnum bæði tað sjónliga og tað ósjónliga, vart, og fer framhaldandi at verja hesa ætt ímóti revsingini fyri óndskap sín. Grunda yvir hetta í hjarta tínum, so at sannleikin kann verða avdúkaður fyri tær, og ver tú stinnur á gøtu Hansara.

12.

Profetar Guðs skulu roknast sum læknar, hvørs arbeiði er, at fremja vælveruna hjá heiminum og heimsins fólkasløgum, so at teir, gjøgnum anda einleikans, mega grøða sjúkuna hjá eini syndraðari mannaætt. Ongum er givið loyvið til at ivast í orðum teirra ella at niðra atburð teirra, tí teir eru teir einastu, ið kunnu siga seg at hava skilt sjúklingin, og at hava greinað sjúku hansara rætt. Eingin,

hvussu skørp fatan hansara so er, kann nakrantíð gera sær vónir um at røkka tær hæddir, ið vísdómurin og skilið hjá tí guddómliga læknanum hava rokkið. Tískil hevði tað ikki verið løgið, um viðgerðin, fyriskrivað av læknanum á hesum degi, ikki var lík tí, sum hann fyriskrivaði frammanundan. Hvussu kundi tað verið øðrvísi, tá ið meinini, ið raka tann líðandi, á hvørjum serstøkum sjúkustigi, gera ein serligan heilivág neyðugan? Á sama hátt, hvørja ferð, tá ið profetar Guðs hava upplýst heimin við skæra ljómanum frá morgunstjørnuni av guddómligum kunnleika, hava teir støðugt heitt á heimsins fólkasløg um at taka ímóti ljósi Guðs á slíkan hátt, ið best hóskaði til krøvini hjá tí øld, sum teir komu til sjóndar í. Teir vóru soleiðis førir fyri at syndra myrkur fákunnunar, og at geva heiminum burtur av dýrdini av teirra egna kunnleika. Tað er tí mótvegis innasta kjarnanum hjá hesum profetum, at eygað hjá hvørjum skynsomum manni má vendast, við tað at einasta ætlan teirra altíð hevur verið, at leiðbeina tey vilstu, og at veita teimum píndu frið. Hetta eru ikki dagar av framburði og sigursælu. Øll mannaættin er í valdinum á margfaldum líðingum. Strembið tí eftir, at bjarga lívi hennara við tí gagnliga heilivági, sum almáttuga hondin hjá læknanum, ið ongantíð fer skeivur, hevur gjørt.

13.

Tú skalt vita, at tá Menniskjusonurin gav upp anda sín til Guð, græt øll skapanin inniliga. Men við at offra seg sjálvan, varð ein nýggj megi veitt øllum skaptum lutum. Tekin hennara, soleiðis, sum hon er váttað í øllum fólkasløgum jarðarinnar, standa nú sjónlig fyri tær. Hin djúpasti vísdómur, ið tey vitugu hava givið frá sær, hin mest djúphugsaði lærdómur, ið nakar hugi er komin við, listin, ið tær kringastu hendur hava virkað, ávirkanin, ið er framd av teimum máttmiklastu valdsharrunum, alt hetta er einki uttan hin lívgevandi megin, ið á henda hátt kemur til sjóndar, megin ið er leysgivin vegna Hansara gøvgaða, Hansara ljómandi anda, sum gjøgnumseyrar alt.

Vit vitna, at tá ið Hann kom inn í heimin, kastaði Hann dýrdarglæmu sína á allar skaptar lutir. Gjøgnum Hann grøddist hin spitalski fyri spitalskusjúku treiskleikans og fákunnunar. Gjøgnum Hann vórðu tey óreinu og sjálvrádnu lekt. Gjøgnum Hansara megi, ið er fødd av hinum almáttuga Guði, vórðu eygu teirra blindu latin upp, og sál syndarans halgað.

Spitalskusjúka kann verða tulkað sum eitt og hvørt slør, sum kemur ímillum menniskjuna og førleika hennara at kenna Harran, Guð hennara aftur. Hvør tann, sum loyvir sær sjálvum at verða stongdur úti frá Honum, er vissuliga ein spitalskur, sum ongin skal minnast í kongsríki Guðs, tí máttmikla, tí allovaða. Vit bera vitnisburð um, at við megi Guðs varð hvør spitalskur reinsaður, hvør sjúka grødd, og hvør mannaveikleiki rikin burtur. Hann er tann, sum reinsaði heimin. Vælsignaður er tann, sum við einum ljósgeislandi andliti hevur vent sær móti Honum.

14.

Ver vísur í, at í hvørjari trúarskipan er ljósið av guddómligari opinbering givið menniskjunum í neyvum samsvari við andliga førleika teirra. Hugsa um sólina. Hvussu veikir hennara geislar eru, í tí løtu, tá ið hon vísur seg omanfyri havsbrúnni. Hvussu líðandi hiti og styrki hennara vaksa, sum hon nærkast sínum hámarki, samstundis sum hon ger allar skaptar lutir førar fyri at laga seg til vaksandi styrkina í ljósi hennara. Hvussu javnt hon fer niður, til hon røkkur staðinum, hon setur. Um hon, knappliga, vísti ta megi, sum er í henni, hevði hetta, uttan iva, voldað øllum skaptum lutum skaða .... Á sama hátt, um sól sannleikans, á fyrstu sýningarstigum sínum, knappliga opinberaði allar teir førleikar, ið forsjón hins almáttuga hevur veitt henni, hevði jørðin av mannafatan hjánað burtur og verið tærd; tí mannahjørtuni høvdu hvørki tolt styrkina í opinbering hennara, ella verið før fyri at endurspegla geislingina frá ljósi hennara. Ráðaleys og kollgingin høvdu tey horvið.

15.

Vendið hjørtum tykkara, O fólk Guðs, mótvegis ráðunum hjá tykkara sanna, tykkara ósamanberiliga vini. Orð Guðs kann líknast við eitt ungt træ, hvørs røtur eru plantaðar í mannahjørtuni. Tað hvílir á tykkum, at ala upp vøkstur tess við livandi vatninum av vísdómi, av halgaðum og heilagum orðum, so at røtur tess mega fáa gott festi, og greinar tess mega breiðast út, so høgt sum til himmalin og longur.

O tit, ið dvølja á foldum! Høvuðseyðkennið, ið sermerkir tað framúrskarandi lyndið hjá hesari hægstu opinbering, er tað, at Vit øðrumegin hava tikið alt burtur av síðunum í heilagu bók Guðs, ið hevur verið orsøk til klandur, óndskap og harm millum mannabørnini, og hinvegin hava fyriskipað tær grundleggjandi fortreytirnar fyri semju og skilningi, og fyri fullkomnari og varandi eind. Væl er tað statt teimum, ið halda lógir Mínar.

Ferð eftir ferð hava Vit mint Okkara elskaðu á, at sleppa sær undan, nei, at flýggja undan øllum tí, sum rýkur av óndskapsins deymi. Heimurin er í stórum ruðuleika, og hugurin hjá fólkum hansara er í fullkomnari ørvitisstøðu. Vit biðja inniliga hin almáttuga um, at Hann náðiliga vil upplýsa tey við dýrdini av ræ ttvísi sínum, og gera tey før fyri at koma fram á tað, ið fer at vera gagnligt fyri tey til allar tíðir og undir øllum umstøðum. Hann er sanniliga tann, ið hevur alt, hin hægsti.

16.

Eg syrgi ikki orsaka av Mínari fangilsisbyrðu. Ei heldur gremji Eg Meg um Mína eyðmýking, ella um tann trega, ið Mínir fíggindar hava komið mær í. Við Mínum lívi! Tey eru dýrd Mín, ein dýrd, sum Guð hevur prýtt sjálvan seg við. Gævi, at tit vistu tað!

Skommin, ið Eg varð noyddur at taka á Meg, hevur avdúkað ta dýrd, ið øll skapanin var vorðin útgjørd við, og orsakað av teimum grimdum, ið Eg havi tolt, hevur morgunstjørna rættvísinnar víst seg, og kastað glæmu sína á menniskjuni.

Mínar sorgir standast av teimum, ið hava fløkt seg inn í teirra egnu spiltu trá, og sum siga seg vera í parti við trúgv Guðs, hins miskunnsama, hins allovaða.

Tað sømir seg fólki Bahás, at doyggja frá heiminum og øllum tí, sum er í honum, at vera so óheft av øllum verðsligum lutum, at íbúgvar paradísar mega anda í seg hin søtt luktandi halganarangan av klæði teirra, til tess at øll fólk jarðarinnar mega kenna aftur á andlitum teirra bjartleika hins almiskunnsama, og at tekin og ímyndir Guðs, hins almáttuga, hins alvísa, mega verða breidd út gjøgnum tey. Tey, ið hava dálkað vakra navn sakar Guðs, við at leggja seg eftir tí, ið er holdbundið - hesi eru týðiliga farin skeiv!

17.

O gýðingar! Um tit tráa eftir, einaferð afturat, at krossfesta Jesus, anda Guðs, so drepið Meg, tí Hann er einaferð enn, í Mær, komin til sjóndar fyri tykkum. Gerið við Meg, sum tit vilja, tí Eg havi givið lyfti um, at offra lív Mítt á gøtu Guðs. Eg fari ikki at ræðast nakran, um so jarðarinnar og himmalsins máttir sameinast ímóti Mær. Tit, ið fylgja evangeliinum! Um tit brellast eftir, at sláa í hel Muhammad, ápostul Guðs, so takið Meg og gerið enda á lívi Mínum, tí Eg eri Hann, og Mítt innasta er Hansara innasta. Farið við Mær, sum tykkum lystir, tí djúpasti longsul hjarta Míns er, at røkka hjáveru Míns hægst elskaða í Hansara kongsríki av dýrd. Soleiðis er tann guddómliga fyriskipanin, um tit vita tað. Fylgisneytar Muhammads! Um tit ynskja tykkum at, við ørvum, gjøgnumgata bróst Hansara, sum hevur latið bók sína, Bayánina, verða senda niður til tykkara, so leggið hendur á Meg og forfylgið Mær, tí Eg eri Hansara høgtelskaði, opinberingin av Hansara egna

innasta, hóast Mítt navn ikki er Hansara navn. Eg eri komin í skugganum undir dýrdarskýggjunum, og Guð hevur givið mær óvikandi ræði. Hann er, vissuliga, sannleikin, hin, ið er vitandi um tað ósædda. Eg vænti Mær, sanniliga, ta somu viðferð av tykkum, sum tit góvu Honum, ið kom undan Mær. Um hetta ber, sanniliga, alt vitnisburð, um tit eru av teimum, ið lurta. O fólk Bayánunnar! Um tit hava avgjørt, at hella út blóð Hansara, hvørs komu Báburin hevur boðað frá, hvørs framkomu Muhammad hevur spátt um, og hvørs opinbering Jesus Kristus sjálvur hevur kunngjørt, so síggið Meg standa, tøkan og verjuleysan, frammanfyri tykkum. Gerið við Meg sum tit sjálvi ynskja.

18.

O fólk! Eg svørji við hin eina sanna Guð! Hetta er havið, haðani allir sjógvar eru komnir, og sum hvør teirra at enda skal verða sameindur við. Frá Honum eru allar sólirnar komnar, og til Hansara skulu tær allar venda aftur. Við megi Hansara hava trøini av guddómligum opinberingum borið fram fruktir sínar, sum allar eru sendar niður í skapi av einum profeti, sum ber ein boðskap til skapningar Guðs í øllum heimunum, hvørs tal Guð, einsamallur, í altfevnandi kunnleika sínum, megnar at telja. Hetta hevur Hann útinnt gjøgnum ein einstakan bókstav av orði Sínum, opinberaður av penni Hansara - einum penni, ið er førkaður av stýrandi fingri Hansara. Fingur Hansara verður sjálvur borin uppi av megini í sannleika Guðs.

19.

Við rættvísi Guðs, Míns høgtelskaða! Eg havi ongantíð tráað eftir verðsligari leiðslu. Mín einasta ætlan hevur verið, at borið tað víðari til menniskjuni, sum Guð, hin miskunnsami, hin ósamanberiligi, bað Meg um at útvega, so at tað kann skilja tey frá øllum tí, sum er av hesum heimi, og fáa tey at røkka slíkum hæddum, sum hvørki tey óndu mega fata, ella tey sjálvrádnu ímynda sær.

20.

Ein og hvør fordómsfríur eygleiðari er til reiðar at viðganga, at heilt frá byrjanini av opinbering Hansara, hevur hesin misbjóðaði heitt á alla mannaættina um, at venda andlit síni móti degningi dýrdarinnar, og hevur bannað falsi, hatri, kúgan og óndskapi. Og kortini, hyggið at tí, sum hond kúgarans hevur gjørt! Eingin pennur torir at lýsa harðræði hansara. Hóast ætlan Hansara, sum er hin ævigi sannleikin, hevur verið, at veitt øllum menniskjum ævigt lív, og at síggja til tryggleika og frið teirra, verið so kortini vitni til hvussu tey hava reist seg fyri at hella út blóðið hjá Hansara elskaðu, og hava felt yvir Hann deyðadóm.

Tey, ið birtu undir hesa kúging, eru júst tey menniskju, ið, hóast fávitsku sína, eru tald sum tey vísastu av teimum vísu. Slíkur er blindleiki teirra, at tey, við ótilgjørdum harðleika, hava koyrt Hann í hetta víðgirda og tyngjandi fongsul. Og tað hóast heimurin varð skapaður til teirra, ið tæna við gátt Hansara. Hin almáttugi hevur kortini, hóast hesi og tey, ið hava avnoktað sannleikan hjá hesari "Stóru Kunngerð", umskapað hetta fongsulshús til tað mest upphevjaða paradísið, himmal himlanna.

21.

Verøldin hevur barnsverkir, og órógv hennara økist á hvørjum degi. Andlit hennara er vent móti treiskni og vantrúgv. Slík skal støða hennara gerast, at tað ikki hevði verið hóskandi og sømiligt, at avdúka tað nú. Spilla hennara skal leingi standa við. Og tá ið hin ásetti tímin er komin, skal

knappliga tað koma fram, ið fer at fáa allar limir mannaættarinnar at skelva. Tá, og bert tá, fer guddómliga merkið at verða breitt út, og náttargali paradísar at láta songlag sítt.

22.

Sigið: Um tit sóknast eftir hesum lívi og fáfongdum tess, so áttu tit at havt leitað til tær ímeðan tit framvegis vóru í móðurlívi, tí at tá nærkaðust tit teimum støðugt, um tit bert fataðu tað. Tit eru, hinvegin, líka síðan tit vórðu borin í heim og gjørdust fullvaksin, rikin burturfrá heiminum, og eru komin nærri dustinum. Hví tá sýna slíkan hug til at rúgva saman dýrgripir jarðar, tá ið dagar tykkara eru taldir og høvi tykkara nærum er mist? Vilja tit tá ikki, O tit gáloysnu, rista burturav tykkum svøvn tykkara?

Takið tit við teimum ráðum, ið hesin tænari gevur tykkum fyri sakir Guðs. Hann biður, sanniliga, ikki um nakra afturløning frá tykkum, og hevur givið seg undir tað, ið Guð hevur fyriskipað Honum, og er Guðs vilja fullkomiliga lýðin.

Lívsdagar tykkara eru næstan allir brúktir, O fólk, og endi tykkara nærkast skjótt. Leggið, tess vegna, frá tykkum tað, ið tit hava funnið upp á og neyðhalda um, og takið tykkum haldgott tak um fyriskipanir Guðs, so at tit møguliga mega náa tað, ið Hann hevur ætlað tykkum, og mega teljast millum teirra, ið fylgja einari rættari kós. Finnið tykkum ikki fragd í lutum heimsins og fáfongdu skreytum hansara, og setið heldur ikki vónir tykkara til tey. Leggið álit tykkara á minnið um Guð, hin mest upphevjaða, hin størsta. Hann fer, áðrenn langt er umliðið, at gera til einkis allar teir lutir, ið tit eiga. Latið Hann vera ótta tykkara, og gloymið ikki Hansara sáttmála við tykkum, og verið ikki tald millum teirra, ið eru stongd úti frá Honum, eins og av einum sløri.

Ansið tykkum, at tit ikki bólgna av errinskapi frammanfyri Guði, og vanvirðandi vísa frá tykkum Hansara elskaðu. Lútið tit í eyðmýkt fyri teimum trúføstu, teimum, ið hava trúð á Guð og á tekin Hansara, hvørs hjørtu vitna um eind Hansara, hvørs tungur boða frá einleika Hansara, og sum ikki tala, uttan við Hansara loyvi. Soleiðis áminna Vit tykkum við rættvísi, og ávara tykkum við sannleika, so at tit kanska mega verða vakt.

Leggið ikki á nakra sál eina byrðu, ið tit ikki vildu fingið lagda á tykkum, og ynskið ikki nøkrum tað, ið tit ikki vildu ynskt tykkum sjálvum. Hesi eru bestu ráð Míni til tykkara, um tit bert høvdu givið teimum gætur.

Virðið tey heilagu og lærdu tykkara millum, tey hvørs atburður samsvarar við yrki teirra, tey, sum ikki fara út um tað mark, ið Guð hevur ásett, tey, hvørs metingar eru í samsvari við boð Hansara, soleiðis sum tey eru opinberaði í bók Hansara. Tit skulu vita, at tey eru lampur leiðbeiningarinnar hjá teimum, ið eru í himlunum og á jørð. Tey, ið lítilsvirða og kveistra burtur tey heilagu og tey lærdu, ið liva millum teirra - hesi hava sanniliga broytt ta vælvild, ið Guð hevur játtað teimum.

Sigið: Bíðið tit, til Guð hevur broytt vælvild sína til tykkara. Als einki sleppur undan Honum. Hann kennir bæði loynimál himlanna og jarðar. Kunnleiki Hansara fevnir um alt. Fegnist ikki um tað, ið tit hava gjørt, ella fara at gera í framtíðini. Gleðist ei heldur um tær roynslur, ið tit hava volt Okkum, tí tit eru ikki før fyri at hevja støði tykkara við slíkum ráðum sum hesum. Høvdu tit kannað verk tykkara við skørpum skyni. Ei heldur fara tit at gerast før fyri at minka um høga støði Mítt. Nei, Guð fer at leggja afturat tí, sum Hann fer at løna Okkum við, fyri, við áhaldandi treysti, at hava tolt tann trega, ið Okkum var fyri. Hann fer, sanniliga, at økja um samsýning teirra, sum halda á í tolsemi.

Tit skulu vita, at roynslur og mótburður, frá fyrndartíð, hava verið lagnan hjá Guðs útvaldu og Hansara elskaðu, og hjá slíkum av tænarum Hansara, ið eru óheftir av øllum uttan Honum, tænarar, sum hvørki handilsvørur ella handil megna at lumpa soleiðis, at teir gloyma hin almáttuga, tænarar, sum ikki tala fyrr enn Hann hevur talað, og sum bera seg at sambært boðum Hansara. Soleiðis er háttalag Guðs framt í forðum, og soleiðis fer tað at verða verandi í framtíðini. Vælsignaði eru tey, ið

stinn halda á, tey, ið eru tolin undir líðingum og trongdum, sum ikki gremja seg um nakað, ið rakar tey, og sum ganga leið langmóðar....

Tann dagur nærkast, tá ið Guð fer at hava reist upp eitt fólk, ið fer at minnast dagar Okkara, ið fer at siga frá søguni um roynslur Okkara, ið fer at krevja endurreising av rættindum Okkara av teimum, sum uttan eitt vet av prógvi, eru farin við Okkum við eyðsæddum órættvísi. Guð ræður, vissuliga, yvir lívum teirra, ið hava gjørt Okkum órætt, og Hann er væl vitandi um gerðir teirra. Hann fer, vissuliga, at leggja hond á teir fyri misgerðir teirra. Hann er, sanniliga, hin ræðuligasti av hevnarum.

Soleiðis hava Vit sagt tykkum frá søgum hins eina sanna Guðs, og sent niður til tykkum tað, ið Hann hevði fyriskipað frammanundan, so at tit kanska mega biðja Hann um fyrigeving, mega venda aftur til Hansara, mega veruliga angra, mega gerast greið yvir misgerðir tykkara, mega rista svøvn tykkara av tykkum, mega vakna úr líkasælu tykkara, mega bøta fyri tað, ið tit hava vanskettað, og vera millum teirra, ið gera væl. Lat hann, sum vil, viðurkenna sannleikan í Mínum orðum; og hvat viðvíkur honum, sum ikki vil, lat hann venda sær burtur. Mín einasta skylda er, at áminna tykkum um tykkara vanrøkt av skylduni mótvegis søk Guðs, um kanska tit eru av teimum, ið geva Mínari ávaring gætur. Lurtið tí eftir talu Mínari, og vendið aftur til Guð og angrið, so at Hann, gjøgnum náði sína, kann miskunna tykkum, kann vaska burtur syndir tykkara, og fyrigeva misbrot tykkara. Stórleikin í miskunn Hansara fer fram um harðskapin í vreiði Hansara, og náði Hansara fevnir um øll, ið eru skapt og vorðin klødd í lívsins búna, veri tey av tí farna ella av tí komandi.

23.

Javnvág heimsins er skakað av tí skelvandi árini frá hesari størstu, hesari nýggju heimsskipanini. Skipaða lív mannaættarinnar er kollvelt av virkseminum hjá hesari einskilaðu, hesari undursomu skipan - hvørs maka deyðilig eygu ongantíð hava sæð.

Søkkið tykkum í hav orðs Míns, so at tit mega avdúka loynidómar tess, og finna allar tær perlur vísdómsins, ið liggja goymdar í dýpum tess. Ansið tykkum, at tit ikki ivast í avgerð tykkara um at fevna um sannleikan í hesi søk - eini søk, har møguleikarnir í veldi Guðs eru opinberaðir, og ræði Hansara grundfest. Kvikið tit tykkum til Hansara, við gleðisljómandi andlitum. Hetta er hin óbroytiliga trúgv Guðs, ævig í forðum, ævig í framtíðini. Lat hann, sum leitar, finna hana; og hvat viðvíkur honum, ið hevur noktað at leita til hennara - sanniliga, Guð er sjálvhjálpin, omanfyri ein og hvønn tørv á skapningum sínum.

Sigið: Hetta er hin lýtaleysa javnvágin, sum er í hond Guðs. Í henni eru øll, sum eru í himlunum, og øll sum eru á foldum, vigaði, og lagna teirra avgjørd, um tit eru av teimum, ið trúgva og viðurkenna hendan sannleika. Sigið: Við henni eru tey fátøku ríkaði, tey lærdu upplýst og tey leitandi gjørd før fyri at stíga upp til hjáveru Guðs. Ansið tykkum, at tit ikki lata hana gerast orsøk til ósemju tykkara millum. Verið tit eins rimmarføst og hitt óvikandi fjallið í søk Harra tykkara, hinum máttuga, hinum sum elskar.

24.

Fallið ikki í fátt, O fólk heimsins, tá ið morgunstjørna fagurleika míns er farin undir kav, og himmallin av tjaldtempli Mínum er duldur fyri eygum tykkara. Reisist fyri at fremja søk Mína, og til tess at upphevja orð Mítt millum menniskjuni. Vit eru við tykkum í allar ævir, og fara at styrkja tykkum við megi sannleikans. Vit eru sanniliga almáttugir. Hvør tann, ið hevur viðurkent Meg, vil reisast og tæna Mær við slíkum fastleika, at megi jarðarinnar og heimsins ikki skal vera før fyri at sigra á ætlan hansara.

Fólk heimsins eru í fasta svøvni. Um tey vaknaðu úr blundi sínum, høvdu tey íðin skundað sær til Guð, hin alvitandi, hin alvísa. Tey høvdu kastað burtur allar ognir sínar, um tað so vóru allir dýrgripir jarðarinnar, so at Harri teirra kundi minst til tey í tann mun, at Hann talaði bert eitt einasta orð við tey. Slík er tann vegleiðingin, ið Hann hevur givið tykkum. Hann, sum eigur kunnleikan um tað dulda, á einari talvu, sum skapanareygað ikki hevur sæð, og sum eina er opinberað Honum, alvaldandi verja hjá øllum heimum. So ørkymlaði eru tey í fyllskapinum av teirra óndu tráanum, at tey ikki megna at kenna Harran yvir øllum verum aftur. Harran, hvørs rødd kallar hart úr øllum ættum: "Tað er eingin annar Guð uttan Eg, hin máttmikli, hin alvísi."

Sigið: Fegnist ikki um teir lutir, sum tit eiga; í nátt eru teir tykkara, í morgin fara onnur at eiga teir. Soleiðis ávarar tykkum Hann, sum er hin alvitandi, hin alupplýsti. Sigið: Kunnu tit siga, at tað, sum tit eiga, er varandi ella trygt? Nei! Við Mær sjálvum, hinum almiskunnsama. Lívsdagar tykkara flýggja burtur sum eitt fleyr, og øll skreyt og dýrd tykkara skal gerast til einkis, eins og skreyt og dýrd teirra, ið vóru frammanundan tykkum, varð gjørt til einkis. Hugsið, O fólk! Hvat er vorðið av tykkara farnu døgum, tykkara mistu øldum? Eydnuríkir teir dagarnir, ið hava verið vígdir minninum um Guð, og vælsignaðir teir tímarnir, ið nýttir eru í lovprísan av Honum, sum er hin alvísi. Við Mínum lívi! Hvørki skreytið hjá teimum máttmiklu, ella ríkidømið hjá teimum múgvandi, ella sjálvt valdið hjá teimum ógudiligu fer at verða standandi. Alt fer at hvørva, við einum orði frá Honum. Hann er, sanniliga, hin magnandi, hin ið noyðir alt og øll, hin almáttugi. Hvør fyrimunur er tað í teimum jarðarligu lutunum, sum menniskjuni eiga? Tað, ið skal gagna teimum, hava tey fullkomiliga kveistrað burtur. Áðrenn langt er umliðið, fara tey at vakna úr sínum dúri, og tey fara at sanna, at tey eiga ikki førleikan at ogna sær tað, sum fór framvið teimum á døgum Harra teirra, tí almáttuga, tí allovaða. Høvdu tey bert vitað tað, so høvdu tey givið frá sær alt, ið er teirra, so at nøvn teirra mega verða nevnd fyri trónu Hansara. Tey eru, sanniliga, tald millum tey deyðu.

25.

Latið ikki hjørtu tykkara ørkymlast, O fólk, tá ið dýrdin av hjáveru Míni er tikin aftur, og hav talu Mínar liggur í tigandi logn. Tað býr vísdómur í Míni hjáveru tykkara millum, og í Mínari fráveru er uppaftur ein annar vísdómur, sum ongin megnar at rannsaka uttan Guð, hin ósamanberiligi, hin alvitandi. Sanniliga, Vit eygleiða tykkum úr dýrdarríki Okkara, og fara at stuðla hvørjum tí, sum reisist fyri sigri sakar Okkara, við herskaranum hjá fylkingini í tí høga, og einum liði av Okkara hægst mettu einglum.

O fólkasløg jarðarinnar! Guð, hin ævigi sannleikin, er Mítt vitni um, at flóðir av frískligum og mjúkliga floymandi vatni eru skolaðar úr klettunum, vegna søtleikan í teimum orðum, ið Harri tykkara hevur á munni, Hann, ið ongantíð varð fjøtraður; og framvegis durva tit. Kastið burtur tað, sum tit eiga, og flúgvið upp um allar skaptar lutir á loysingarveingjum. Hetta býður Harri skapaninnar tykkum. Rørslan av penni Hansara hevur kollvelt sál mannaættarinnar.

Vita tit úr hvørjum hæddum Harri tykkara, hin ærumikli, kallar? Halda tit, at tit hava kent aftur pennin, sum Harri tykkara, Harri alra navna, gevur tykkum boð við? Nei, við lívi Mínum! Høvdu tit bert vitað tað, so høvdu tit avkannað tykkum heimin, og høvdu skundað tykkum av heilu hjørtum tykkara, til hjáveru hins høgtelskaða. Andar tykkara høvdu verið so frá sær sjálvum av orði Hansara, at øsing hevði komið í hin størra heimin - hvussu nógv meira tá á hendan lítla og týdningarleysa! Soleiðis eru gávuflóðir Mínar oystar niður av miskunnarhimli Mínum, sum eitt tekin um Mína náði; so at tit mega teljast millum tey takksomu....

Ansið tykkum, at tráanirnar hjá holdinum og hjá einum spiltum lyndi ikki elva til spjaðing tykkara millum. Verið tit eins og fingrarnir á einari hond, limirnir á einum kroppi. Soleiðis mælir opinberingarpennurin tykkum til, um tit eru av teimum, ið trúgva.

Hugsið um náði Guðs og gávur Hansara. Hann áleggur tykkum tað, ið skal gagna tykkum, hóast Hann sjálvur væl kann vera allar skapningar fyriuttan. Tykkara óndu gerðir kunnu ongantíð skaða Okkum, ei heldur kunnu tykkara góðu verk gagna Okkum. Vit streingja á tykkum fyri Guðs sakir einans. Hvør maður, sum eigur skil og innlit, ber vitnisburð um hetta.

26.

Skræðið sundur, í Mínum navni, slørini, ið so syndarliga hava blindað sjón tykkara, og syndrið avgudarnar av fáfongdari herming, við megini, ið er fødd av trúgv tykkara á eind Guðs. Stígið, síðani, inn í heilaga góðvildarparadís hins almiskunnsama. Halgið sálir tykkara frá øllum tí, sum ikki er av Guði, og smakkið søtleikan í hvíld innanfyri markið av Hansara ovurstóru og máttmiklu opinbering, og í skugganum av Hansara hægstráðandi og lýtaleysa yvirvaldi. Loyvið ikki tykkum sjálvum at vera vavd inn í tjúkku slørini av tykkara sjálvsøknu tráanum, tá ið Eg havi fullfíggjað skapan Mína í hvørjum einstøkum av tykkum, so at dygdin í handverki Mínum til fulnar kann verða opinberað menniskjunum. Hetta merkir, tískil, at hvør maður hevur verið, og framvegis fer at vera, førur fyri av sínum eintingum at virðismeta fagurleika Guðs, hins heiðraða. Um ein maður ikki hevði átt slíkan førleika, hvussu kundi hann tá verið kravdur til svars fyri mistak sítt. Um nakar skuldi verið spurdur, meðan hann stóð í hjáveru Guðs, á tí degi, tá ið øll fólkasløg jarðarinnar eru savnaði saman: "Hví hevur tú ikki trúð á fagurleika Mín, men vent tær burtur frá Mær ?", og ein slíkur maður skuldi svarað og sagt: "Av tí at øll menniskju eru farin skeiv, og eingin hevur lætst at havt hug til at venda andliti sínum til sannleikan, havi eg gjørt eftir fyridømi teirra og eisini syndarliga gloymt at kent aftur fagurleikan hjá hinum æviga", so fer ein slík umbering, vissuliga, at verða havnað. Tí trúgvin hjá einum manni kann ongantíð vera treytað av nøkrum uttan honum sjálvum.

Hesin er ein av sannleikunum, ið liggja varðveittir í opinbering Mínari - ein sannleiki, sum Eg havi opinberað í øllum teimum himmalsku bókunum, sum Eg havi fingið tungu stórfingnis at mælt, og máttarpennin at skriva inn. Hugsið eina løtu um hetta, so at tit, við bæði tykkara innara og uttara eyga, mega síggja fínleikarnar í guddómligum vísdómi, og koma fram á gimsteinarnar av himmalskum kunnleika, sum Eg, á greiðum og sannførandi máli, havi opinberað í hesari upphevjaðu og óspillandi talvu, og so at tit ikki skulu villast langt burtur frá teirri allarhægstu trónuni, frá træinum, sum ongin kann leggja aftur um bak, frá bústaði æviga máttarins og dýrdarinnar.

27.

Viðvíkjandi spurningi tínum um upprunan til skapanina. Tú skalt vita, við vissu, at skapan Guðs altíð hevur verið til, og framhaldandi fer at vera um allar ævir. Byrjan hennara hevur onga byrjan, og endi hennara kennir ongan enda. Navn Hansara, Skaparin, er treytað av einari skapan, eins og heiti Hansara, Harri menniskjunna, má hava við sær, at ein tænari er til.

Hvat viðvíkur teimum framsøgnum, ið eru kannaðar teimum undanfarnu profetunum, so sum "Í byrjanini var Guð; har var eingin skapningur til at kenna Hann", og "Harrin var einsamallur; við ongum at tilbiðja seg", so er týdningurin av hesum og tilíkum framsøgnum greiður og eyðsæddur; og átti ongantíð at verið misskiltur. Um hendan sama sannleika bera hesi orð, ið Hann hevur opinberað, vitnisburð: "Guð var einsamallur; har var eingin uttan Hann. Hann fer altíð at verða verandi tað, ið Hann altíð hevur verið." Hvørt skynsamt eyga sær lættliga, at Harrin nú er komin til sjóndar, kortini er eingin at kenna aftur dýrd Hansara. Hetta skal skiljast soleiðis, at bústaðurin, har hin guddómliga veran dvølir, er langt omanfyri tað, ið nakar megnar at náa ella skilja, uttan Hann. Alt tað, sum í treytaða heiminum antin kann verða orðað ella fatað, kann ongantíð fara útum tey

mørk, sum, av viðføddu náttúru hansara, eru áløgd honum. Guð, einsamallur, fer út um slíkar avmarkingar. Hann er, sanniliga, ævigur. Eingin líki ella felagi hevur verið, ella kann nakrantíð verða, sameindur við Hann. Einki navn kann verða samanborið við navn Hansara. Eingin pennur megnar at lýsa lyndi Hansara, heldur ikki er nøkur tunga før fyri at greiða frá dýrd Hansara. Hann fer, til allar tíðir, at verða verandi ómetaliga upphevjaður yvir ein og hvønn uttan seg sjálvan.

Hugsa um tann tíman, tá ið hægsta birting Guðs opinberar seg sjálva fyri menniskjunum. Áðrenn hesin tímin kemur, er hin fyrndargamla veran, sum framvegis er ókend av menniskjunum og enn ikki hevur borið fram orð Guðs, sjálv hin alvitandi í einum heimi, ið er uttan nakra menniskju, ið hevur kent seg. Hon er sanniliga Skaparin uttan eina skapan. Tí í júst tí løtuni, sum er frammanundan opinbering Hansara, skal hvør einasti skapti lutur fáast at lata upp sál sína til Guð. Hetta er sanniliga dagurin, sum skrivað er um: "Hvørs skal kongsríkið vera hendan dag?" Og eingin er til reiðar at svara!

28.

Viðvíkjandi spurningi tínum um heimar Guðs. Tú skalt av sonnum vita, at heimar Guðs eru óteljandi í tali, og óendaligir í vavi. Eingin er førur fyri at rokna út ella fata teir uttan Guð, hin alvitandi, hin alvísi. Hugsa um støðu tína, tá ið tú svevur. Sanniliga, sigi Eg, er hetta fyribrigdi hitt mest gátuføra av teknum Guðs millum menniskjuni, um tey høvdu hugsað um hetta í hjørtum sínum. Legg til merkis hvussu tað, sum tú hevur sæð í dreymi tínum, eftir eitt ávíst tíðarbil, fullkomiliga er vorðið veruleiki. Um teir heimarnir, sum tú vitjaði í dreymi tínum, høvdu verið samlíkir við tann heimin, sum tú livir í, so hevði tað verið neyðugt hjá tí tilburðinum, sum kom fyri í hesum dreymi, at verið komin í ljósmála í júst tí løtu, tá ið hann fór fram. Um so var, so hevði tú sjálvur verið vitni til tað. Tá ið tað kortini ikki er soleiðis, so má hetta neyðturviliga merkja, at heimurin, sum tú livir í, er ólíkur og fráskildur tí, sum tú hevur upplivað í dreymi tínum. Hesin seinni heimur hevur hvørki byrjan ella enda. Tað hevði verið satt, um tú førdi fram, at hesin sami heimur, soleiðis sum hann er fyriskipaður av hinum dýrdarríka og almáttuga Guði, er innan í tínari egnu veru og er ballaður saman innan í tær. Tað hevði í sama mun verið beint, at hildið fast við, at andi tín, farin út um mørk svøvnsins og loystur frá øllum jarðiskum tilknýti, er, eftir boðum Guðs, fingin at ferðast ígjøgnum eitt ríki, ið liggur fjalt í innasta veruleikanum hjá hesum heimi. Sanniliga sigi Eg, skapan Guðs fevnir um aðrar heimar enn bert hendan, og aðrar skapningar enn bert hesar. Í hvørjum einstøkum av hesum heimum hevur Hann fyriskipað slíkum, ið eingin kann rannsaka uttan Hann sjálvur, hin alrannsakandi, hin alvísi. Hugsa djúpt um tað, ið Vit hava opinberað fyri tær, so at tú kanst gerast varur við ætlan Guðs, Harra tíns, og Harra alra heima. Í hesum orðum eru loyndarmálini av guddómligum vísdómi varðveitt. Vit hava hildið Okkum frá at gera meira burturúr hesum evni orsakað av tí sorg, ið er løgd á Okkum av gerðum teirra, ið eru skapað gjøgnum orð Okkara, um tit eru av teimum, ið vilja lýða á rødd Okkara.

29.

Tú hevur spurt Meg, um menniskjan, ólík profetum Guðs og Hansara útvaldu, fer at varðveita, eftir likamliga deyða sín, júst tey somu eyðkenni, persónmensku, tilvitan og skil, ið sermerkti lív hennara í hesum heimi. Um tað var so, hvussu ber tað tá til, sum tú hevur varnast, at, ímeðan slíkir smáir skaðar á sinnisevni hennara, sum svímilsi og hættislig sjúka taka frá henni skil og tilvitsku hennara, er deyði hennara, sum jú má hava við sær niðurbrótingina av likaminum og upploysingina av luteindum tess, ikki førur fyri at oyðileggja tað skilið og sløkkja ta tilvitskuna? Hvussu kann nakar hugsa sær, at tilvitska og persónmenska menniskjunnar fara at verða varðveitt, tá ið júst tey tólini, ið eru neyðug fyri tilveru og virki teirra, eru fullkomiliga uppløyst?

Tú skalt vita, at mannasálin er hevjað uppum, og er óheft av øllum veikleikum hjá likami og sinni. Tað at ein, ið er sjúkur, sýnir tekin um veikleika, stendst av teimum forðingum, ið leggja seg sjálvar ímillum sál og likam hansara, tí sálin sjálv verður verandi óávirkað av øllum likamligum sjúkum. Hugsa um ljósið frá lampuni. Hóast ein ytri lutur kann forða fyri geislan hennara, so heldur ljósið kortini áfram at skína við óminkaðari megi. Á sama hátt er hvør einasta sjúka, ið rakar likam menniskjunnar, ein kleppur, ið forðar sálini í at sýna viðfødda mátt og megi sína. Men tá ið hon so fer frá likaminum, tá fer hon at sýna slíkt vald, og avdúka eina slíka ávirkan, sum eingin máttur á jørð kann meta seg við. Hvør rein, hvør siðað og halgað sál fer at verða útgjørd við ovurmiklari megi, og fer at frøast við ómetaligari gleði.

Hugsa um lampuna, ið er fjald undir einum skeppumáli. Hóast ljós hennara skínur, so er geisling hennara fjald fyri menniskjum. Á sama hátt, hugsa um sólina, ið hevur verið huld av skýggjunum. Gev gætur eftir hvussu glampi hennara tykist at vera minkaður, ímeðan keldan hjá ljósinum í veruleikanum er vorðin verandi óbroytt. Sál menniskjunnar eigur at verða samanborin við hesa sól, og allir lutir á jørð eiga at verða sæddir sum likam hennara. So leingi sum eingin ytri kleppur kemur ímillum tey, fer likamið, í sínari heild, at halda áfram við at endurspegla ljósið frá sálini, og at vera stuðlað av megi hennara. Men so skjótt sum eitt slør leggur seg sjálvt ímillum tey, so tykist bjartleikin hjá hesum ljósi at minka.

Hugsa aftur um sólina, tá ið hon fullkomiliga er fjald aftanfyri skýggjunum. Hóast jørðin framvegis er upplýst av ljósi hennara, so er styrkin á ljósinum, ið hon fær, munandi minkað. Ikki fyrr enn skýggini eru horvin, kann sólin aftur skína í sínari fullu dýrd. Hvørki hjávera skýggjsins ella frávera tess kann, á nakran hátt, ávirka natúrliga glampa sólarinnar. Sál menniskjunnar er tann sól, sum likam hennara verður upplýst av, og sum tað fær føðslu sína frá, og soleiðis eigur hon at verða vird.

Hugsa, harumframt, um hvussu fruktin, áðrenn hon er evnað, durvandi er til staðar í trænum. Um træið varð høgt í smápettir, so hevði hvørki nakað tekin um fruktina ella nakar partur av henni, hvussu so lítil, verið funnin. Tá ið hon so kemur fram, tá sýnir hon seg kortini, sum tú hevur sæð, í sínum undursama fagurleika og dýrdarríka fullkomileika. Ávísar fruktir náa, í veruleikanum, ikki teirra fullu búning fyrr enn aftaná, at tær eru tiknar av trænum.

30.

Og nú hvat viðvíkur spurningi tínum í sambandi við sál menniskjunnar og undankomu hennara aftaná deyðan. Tú skalt vita við vissu, at sálin, aftaná skilnað hennara frá likaminum, fer at halda áfram við at mennast til hon nær hjáveru Guðs, í einari støðu, sum hvørki kollvelting aldarinnar ella broytingarnar og tilvildirnar av hesum heimi, megna at ávirka. Hon fer at halda á eins leingi og kongsríki Guðs, yvirvald Hansara, ræði og megi Hansara fara at halda á. Hon fer at sýna tekin Guðs og eginleikar Hansara, og fer at opinbera miskunn og gávumildi Hansara. Rørslan hjá penni Mínum steðgar, tá ið hann roynir at lýsa háleikan og dýrdina hjá einari so upphevjaðari legu til fulnar. Tann heiður, sum hond miskunnar fer at veita sálini, er slíkur, sum eingin tunga nøktandi megnar at avdúka, ei heldur kann nøkur onnur jørðisk megi lýsa hann. Sæl er tann sálin, sum, í tí løtu hon loysist frá likaminum, er halgað frá fáfongdu ímyndingunum hjá heimsins fólki. Ein slík sál livir og virkar í samsvari við vilja skapara hennara, og kemur inn í hitt allarhægsta paradísið. Moyggjar himmalsins, íbúgvar í teimum tignarligastu borgunum, fara at sveima rundan um hana, og profetar Guðs og Hansara útvaldu fara at leita til hennara vinalag. Við tey fer hendan sálin ótarnað at tala, og fer at greiða teimum frá tí, ið henni hevur verið fyri á vegi Guðs, Harra alra heima. Um nøkrum manni varð sagt frá tí, ið er fyriskipað einari slíkari sál í heimum Guðs, Harra trónunnar í tí høga og jarðarinnar í neðra, so hevði øll vera hansara, alt fyri eitt, øst seg upp í hansara stóra longsuli eftir at náa hatta mest upphevjaða, hatta halgaða og glæsiliga støðið.... Tað, sum sálin er aftaná deyðan,

kann ongantíð lýsast, heldur ikki er tað hóskiligt og loyvt, at avdúka alt lyndi hennara fyri eygum menniskjunnar. Profetar og boðberar Guðs eru sendir niður við eittans endamáli, tað er at vegleiða mannaættina til hin beina veg sannleikans. Ætlanin við opinbering teirra hevur verið, at kunna og læra øll menniskju, so at tey, í deyðans løtu, mega hevja seg, leys av øllum, í fullkomnum reinleika og heilagleika, at trónuni hjá hinum hægsta. Ljósið, ið skínur av hesum sálum, hevur ábyrgdina av menning heimsins og av framstigunum, sum fólkini í honum gera. Tær eru eins og súrdeiggj, ið gjøgnumsúrgar heim verunnar, og mynda ta upplívandi megina, sum fær listina og kraftagerðir heimsins at verða sjónligar. Gjøgnum tær er tað, at skýggini lata gávumildi sítt regna niður yvir menniskjuni, og at jørðin alir fruktir sínar. Allir lutir mugu neyðturviliga hava eina orsøk, ein rakstrarmátt, eina lívskveikjandi meginreglu. Hesar sálir og ímyndir av sjálvræði hava fingið til vega, og fara framhaldandi at fáa til vega, hina sterkastu áeggjan til rørslu í heimi verunnar.

Heimurin hinumegin er eins ólíkur hesum heiminum og hesin heimurin er ólíkur tí hjá barninum, tá ið tað framvegis er í móðurlívi. Tá ið sálin røkkur hjáveru Guðs, tekur hon sær tað skap, ið best hóskar til ódeyðiligleika hennara og hevur himmalska bústað hennara uppiborið. Ein slík tilvera er ein treytað, og ikki ein fullkomin tilvera, við tað at ein orsøk er gingin undan tí fyrru, ímeðan hin seinna er óheft av nakrari orsøk. Fullkomin tilvera er strangliga avmarkað til Guð, upphevjað veri dýrd Hansara. Væl er tað hjá teimum, ið skilja hendan sannleika. Hevði tú í hjarta tínum hugsað um atburðin hjá profetum Guðs, so hevði tú skjótt og heilt vissuliga ásannað, at tað neyðturviliga mugu vera aðrir heimar til enn bert hesin. Teir flestu av teimum veruliga vísu og lærdu hava, gjøgnum øldirnar, sum dýrdarpennurin staðfesti í talvu vísdómsins, borið vitnisburð um sannleikan í tí, sum Guðs heilaga bók hevur opinberað. Sjálvt materialistarnir hava, í ritum sínum, vitnað um vísdómin hjá hesum guddómliga tilnevndu boðberum, og hava mett sipanirnar hjá profetunum til paradís, helviti, komandi samsýning og revsing, at hava verið eggjaðar av einum ynski um at menna og læra sálir menniskjunnar. Hugsa, tess vegna, um hvussu meginparturin av mannaættini, uttan mun til trúgv ella hugsan, hevur viðurkent teir framúrskarandi eginleikarnar, og ásannað yvirræðið, hjá hesum profetum Guðs. Hesir gimsteinar óbundinleikans eru heiðraðir av summum sum vísdómurin latin í hold, ímeðan onnur meta teir sum málgagnið hjá Guði sjálvum. Hvussu kundu slíkar sálir havt játtað, at givið seg sjálvar yvir til fíggindar sínar, um tær trúðu, at allir heimar Guðs vóru avmarkaðir til hetta jarðiska lívið? Høvdu tær viljugar latið sær lyndað slíkar sorgir og plágur, ið eingin nakrantíð hevur upplivað ella verið vitni til?

31.

Tú hevur sett Mær ein spurning í sambandi við sálarinnar náttúru. Tú skalt, sanniliga, vita, at sálin er eitt tekin Guðs, ein himmalskur gimsteinur, hvørs veruleika teir lærdastu av monnum ikki hava megnað at fata, og hvørs loyndarmál eingin hugi, tað sama hvussu gløggur hann er, nakrantíð kann gera sær vónir um at avdúka. Hon er hin fyrsti av øllum skaptum lutum at vátta dygdargóðsku skapara síns, hin fyrsti til at kenna aftur dýrd Hansara, at halda fast í sannleika Hansara, og at boyggja seg niður í tilbiðjan fyri Honum. Um hon er trúføst ímóti Guði, so fer hon at endurspegla ljós Hansara, og fer, at enda, at venda aftur til Hansara. Um hon, harafturímóti, gloymir trúskap sín mótvegis skapara sínum, so fer hon at gerast eitt offur fyri sjálvsøku og ovurhuga, og fer, at enda, at søkka í dýpi teirra.

Hvør tann, sum á hesum degi, hevur sýtt fyri at latið iva og fyrigyklingar menniskjunnar vent sær burtur frá Honum, sum er hin ævigi sannleikin, og ikki hevur loyvt hurlivasanum, ið er íbirtur av teimum kirkjuligu og verðsligu myndugleikunum, at ræða seg frá at viðurkenna boðskap Hansara, ein slíkur maður fer at verða mettur av Guði, Harranum hjá øllum menniskjum, sum eitt av máttmiklastu teknum Hansara, og fer at verða taldur millum tey, hvørs nøvn eru skrivaði niður í bók

Hansara við penni hins hægsta. Sælur er hann, ið hevur dugað at sæð tann sanna stórleikan hjá eini slíkari sál, ið hevur viðurkent støði sítt, og varnast dygdir sínar.

Nógv er skrivað í tær gomlu bøkurnar viðvíkjandi teimum ymsu stigunum í menning sálarinnar, so sum girnd, bráðlyndi, íblástri, góðgerðarsemi, nøgdsemi, guddómligari vælvild og tílíkum; pennur hins hægsta vil kortini treyðugt gera meira burturúr teimum. Heiðurin og dýrdin hjá øllum stórum nøvnum og tignarstigum, skulu verða veitt Hvørjari sál, ið eyðmýkiliga gongur við Guði sínum, á hesum degi, og heldur fast í Honum.

Tá ið menniskjað svevur, kann sálin, samsvarandi síni natúru, undir ongum umstøðum, sigast at hava verið ávirkað av nøkrum ytri luti. Hon loyvir ongum broytingum í sínari upprunaligu støðu ella lyndi. Eitt og hvørt frávik í virki hennara skal kannast orsøkum uttanífrá. Tað eru hesar atvoldir uttanífrá, sum elva til øll frávik í umhvørvi, skili og uppfatan hennara.

Hugsa um mannaeygað. Hóast tað hevur førleikan at síggja allar skaptar lutir, so kann sjálvt tað minsta brekið tarna sjón tess í so stóran mun, at tað tekur frá tí megina at síggja nakran lut yvirhøvur. Lovprísað veri navn Hansara, sum hevur skapað, og sum er orsøkin til hesar orsøkir, Hann sum hevur fyriskipað, at allar broytingar og øll frávik í heimi verunnar eru treytað av teimum. Hvør einasti skapti lutur í øllum alheiminum er bert einar dyr, ið føra inn í kunnleika Hansara, eitt tekin um ræði Hansara, ein opinbering av nøvnum Hansara, ein ímynd av hátign Hansara, eitt merki fyri megi Hansara, ein háttur at vinna sær atgongd til beina veg Hansara....

Sanniliga sigi Eg, mannasálin er, í kjarna sínum, eitt av teknum Guðs, eitt loyndarmál millum loyndarmál Hansara. Hon er eitt av máttmiklu teknum hins almáttuga, hon er tann, ið boðar frá veruleikanum hjá øllum heimum Guðs. Innan í henni er goymt tað, ið heimurin als ikki er førur fyri at fata nú. Hugsa í hjarta tínum um opinberingina av sál Guðs, sum mettar allar lógir Hansara, og samanber hana við tað vesala og slúkna lyndið, sum hevur gjørt uppreistur ímóti Honum, sum forðar menniskjunum í at venda sær til navnanna Harra, og sum fær tey til at fylgja girndum og óndskapi sínum. Ein slík sál hevur, sanniliga, reikað langt eftir hini rangu gøtuni....

Tú hevur, harumframt, spurt Meg um støðu sálarinnar aftaná skilnað hennara frá likaminum. Tú skalt, av sonnum, vita, at um mannasálin hevur gingið leiðir Guðs, so fer hon, við vissu, at venda aftur til og verða sameind við dýrd hins elskaða. Við rættvísi Guðs! Hon fer at røkka einum støði, ið eingin pennur megnar at lýsa, ella nøkur tunga greiða frá. Tann sál, ið hevur verið verðandi trúføst ímóti søk Guðs, og hevur staðið óvikandi og avgjørd á vegi Hansara, fer eftir himmalsferð sína, at hava slíka megi, at allir teir heimar, ið hin almáttugi hevur skapað, kunnu hava gagn av henni. Ein slík sál fær, eftir boðum frá hinum fullkomna konginum og guddómliga uppalaranum, hitt reina súrdeiggj, ið gjøgnumsúrgar heim verunnar, til vega, og hon veitir ta megi, sum listir og undur heimsins eru gjørd sjónlig við. Hugsa um hvussu mjølinum tørvar súrdeiggj at verða gjøgnumsúrgað við. Tær sálir, ið eru ímyndir av óbundinleika, eru súrdeiggj heimsins. Hugsa djúpt um hetta, og ver tú ein teirra, ið eru takksom.

Í fleiri av talvum Okkara hava Vit sipað til hetta evni, og hava greitt frá teimum ymisku stigunum í menning sálarinnar. Sanniliga sigi Eg, mannasálin er hevjað upp um alla burturferð og afturkomu. Hon stendur í stað, og kortini sveimar hon; hon rørist, og kortini stendur hon í stað. Hon er, í sjálvari sær, ein vitnisburður, ið vitnar um tilveruna av einum heimi, ið er treytaður, og samstundis vitnar hon um veruleikan hjá einum heimi, ið hvørki hevur byrjan ella enda. Legg til merkis hvussu dreymurin, ið tú hevur droymt, aftaná at fleiri ár eru liðin, enn einaferð fer fram fyri eygum tínum. Hugsa um hvussu løgið tað gátuføra í tínum dreymaheimi er. Grunda í hjarta tínum um órannsakandi vísdóm Guðs, og hugsa djúpt um margfaldu opinberingar Hansara....

Lít við eygum tínum á undursomu prógvini um handaverk Guðs, og umhugsa vav og eginleikar tess. Hann, sum er innsigli profetanna hevur sagt: "Lat mína undran vaksa og lat meg gerast uppaftur meira hugtiknan av Tær, O Guð!"

Hvat viðvíkur spurningi tínum, um alisligi heimurin á nakran hátt er avmarkaður, skalt tú vita, at fatanin av hesum viðurskiftum er treytað av eygleiðaranum sjálvum. Á ein hátt er hann avmarkaður, á ein annan er hann hevjaður upp um allar avmarkingar. Hin eini sanni Guð hevur altíð verið til, og fer áhaldandi altíð at vera til. Skapan Hansara hevur, á sama hátt, onga byrjan havt, og fer ongan enda at hava. Alt tað, sum er skapað, hevur tó havt eina orsøk undan sær. Hendan sannroynd prógvar, í sær sjálvari, omanfyri allan iva, eind skaparans.

Tú hevur, harumframt, spurt Meg, um náttúru himnahválvanna. Fyri at skilt náttúru teirra, hevði tað verið neyðugt at kannað týdningin av teimum ábendingum, ið eru givnar í bókum fyrndarinnar, um himnahválvini og himlarnar, og at verða var við hvussu ið samband teirra við hendan evnisliga heim er háttað, og at varnast ávirkanina, ið tær hava á hann. Hvørt hjarta fyllist við undran av einum so fløktum evni, og hvør hugi ørkymlast av loyndarmáli tess. Guð, einsamallur, megnar at fata týdning tess. Teir lærdu, ið hava ásett aldurin hjá hesari jørð til nøkur túsund ár, hava, alla ta longu kanningartíð teirra, gloymt, at hava bæði talið og aldurin á hinum gongustjørnunum í huga. Gev, harumframt, teimum margfaldu frávikunum gætur, ið eru úrslit av ástøðunum, ið hesir menn hava sett fram. Tú skalt vita, at hvør einasta fastastjørna hevur sínar egnu gongustjørnur, og hvør einasta gongustjørna sínar egnu skapningar, hvørs tal ongin menniskja megnar at rokna seg fram til.

O tú, ið hevur fest eygu tíni á ásjón Mína! Morgunstjørna dýrdarinnar hevur, á hesum degi, sýnt geislan sína, og rødd hins hægsta kallar. Vit hava áður talað hesi orð: "Hetta er ikki dagurin, har nakar eigur at ivast í Harra sínum. Tað sømir seg hvørjum tí, ið hevur lurtað eftir kalli Guðs, soleiðis sum tað er borið fram av Honum, sum er morgunstjørna dýrdarinnar, at reisast og rópa hart: `Her eri eg, her eri eg, O Harri alra navna; her eri eg, her eri eg, O skapari himlanna! Eg vitni, at gjøgnum opinbering Tína er tað loynda í bókum Guðs avdúkað, og at alt tað, ið boðberar Tínir hava fest á blað, í teimum heilagu skriftunum, er fullgjørt.´"

32.

Og nú hvat viðvíkur spurningi tínum, um mannasálirnar halda áfram at vera tilvitandi um hvørja aðra aftaná skilnað teirra frá likaminum. Tú skalt vita, at sálirnar hjá fólki Bahás, ið eru komnar inn í, og eru grundfestar í skarlaksreyðu ørkini, fara at koma saman og fara at tala við hvørja aðra í trúnaði, og tær fara at vera so tætt sameindar í teirra lívi, teirra tráanum, tilætlanum og strembanum, at tær fara at vera eins og ein sál. Hesar eru av sonnum tær, ið eru væl upplýstar, ið eru gløggskygdar, og sum eiga skil. Soleiðis hevur Hann fyriskipað tað, Hann, sum er hin alvitandi, hin alvísi.

Fólk Bahás, ið eru íbúgvar á ørk Guðs, eru, øll somul, væl vitandi um støðuna og standin hjá hvørjum øðrum, og eru sameind í bondum inniligleikans og vinalagsins. Ein slík støða má tó vera treytað av trúgv og atburði teirra. Tey, ið eru á sama stigi og støði eru fullkomiliga vitandi um førleikan, lyndið, evnini og dygdirnar hjá hvørjum øðrum. Tey, ið eru á einum lægri støði, eru, harafturímóti, ikki før fyri at skilja støði sítt til fulnar, ella at meta um dygdirnar hjá teimum, ið eru omanfyri tey. Hvør einasti fer at fáa lut sín frá Harra tínum. Sælur er tann, ið hevur vent andliti sínum móti Guði, og gingið støðufastur í kærleika Hansara, til sál hansara hevur stýrt veingjaflogi sínum móti Guði, hægsta Harra alra, hinum máttmiklasta, hinum, ið æviga fyrigevur, hinum almiskunnsama.

Gudloysingarnir, harafturímóti, skulu - og um hetta beri Eg vitnisburð - tá ið teir draga sín seinasta andadrátt, verða gjørdir varir við alt tað góða, ið er gloppið teimum av hondum, og skulu gráta um støðu sína, og skulu eyðmýkja seg sjálvar fyri Guði. Teir skulu halda á við at gera soleiðis, aftaná at sálir teirra eru skildar frá likamum teirra.

Tað er greitt og eyðsýnt, at øll menniskju, aftaná likamliga deyða teirra, skulu meta um virðið á gerðum sínum, og skulu fata alt tað, ið hendur teirra hava gjørt. Eg svørji við morgunstjørnuna, ið

skínur omanfyri havsbrúnni av guddómligari megi! Tey, ið fylgja hinum eina sanna Guði, skulu, í tí løtu, tá ið tey fara úr hesum lívi, uppliva slíka frøi og gleði, sum tað hevði verið ógjørlig at lýst í orðum, ímeðan tey, sum liva í skeivleika skulu verða yvirtikin av slíkum ótta og slíkari nøtran, og skulu fyllast við ræðslu so ræðuligari, at hon ikki kan sammetast við nakað. Væl stendur til hjá honum, ið hevur kulkað úrvalda og óspillandi vín trúarinnar í seg, gjøgnum miskunnsomu vælvild og margfaldu gávur Hansara, sum er Harri alra trúar....

Hetta er dagurin, tá ið tey, ið Guð hevur góðan tokka til, áttu at havt eygu síni vend ímóti birting Hansara, og fest tey við alt tað, ið hesari birting hóvar at opinbera. Ávísir siðir úr farnum øldum byggja ikki á nakað grundarlag yvirhøvur, ímeðan tær uppfatanir, ið undanfarin ættarlið hava tikið undir við, og sum tey hava skrivað niður í bøkur sínar, fyri tað mesta hava verið ávirkaðar av girndunum hjá einum spiltum lyndi. Tú sært hvussu tær flestu viðmerkingarnar og tulkingarnar av orðum Guðs, ið nú eru vanligar manna millum, eru uttan nakran sannleika yvirhøvur. Fals teirra er, í nøkrum førum, vorðið avdúkað, tá ið tey slørini, sum komu ímillum, vórðu skrødd sundur. Tey hava sjálvi viðurkent, at roynd teirra at skilja merkingina av orðum Guðs er miseydnað.

Ætlan Okkara er at sýna, at um tey, sum Guð hevur tokka til, høvdu halgað hjørtu og oyru síni frá teimum fáfongdu framsøgnum, ið vórðu bornar fram í farnum tíðum, og høvdu vent sær við inniligastu sálum sínum til Hansara, sum er degningurin av opinbering Hansara, og til alt tað, ið Hann hevur opinberað, so hevði slíkur atburður verið mettur sum stórliga rósverdugur í eygum Guðs....

Lovprísa navni Hansara, og ver tú taldur millum tey takksomu. Ber kvøður Mínar til Míni elskaðu, sum Guð hevur valt burturúr til kærleika sín, og sum hann hevur fingið til at røkka teirra mál. Øll dýrd veri Guði, Harra alra heima.

33.

Bók Guðs er víðopin, og orð Hansara kallar mannaættina saman til Hansara. Kortini eru tað bert nøkur heilt fá, ið tykjast at vera fús at halda fast í søk Hansara, ella at gerast amboð fyri fremjanini av henni. Hesum fáu er veittur hin guddómligi heilsudrykkurin, ið, einsamallur, kann umskapa rusk heimsins til reinasta gull, og tey eru gjørd før fyri, at geva øðrum tann lýtaleysa heilivágin fyri allar tær sjúkur, ið raka mannabørnini. Eingin kann fáa ævigt lív, uttan so at hann tekur ímóti sannleikanum í hesari ómetandi, hesari undursomu, og stórbæru opinbering.

Lurtið, O vinir Guðs, eftir rødd Hansara, sum heimurin hevur misbjóðað, og haldið fast við alt tað, ið fer at upphevja søk Hansara. Hann vegleiðir, sanniliga, hvønn tann sum Hann vil, til beinu gøtu sína. Hetta er ein opinbering, ið veitir teimum veiku styrki, og krýnir tey fátøku við ríkidømi.

Ráðførið tit tykkum við hvønn annan, í størsta vinsemi og í fullkomnum brøðralagsanda og vígið dýrabaru lívsdagar tykkara til heimsins bata og fremjanina av søk Hansara, sum er fyrndargamal og hægsti Harri alra. Hann áleggur, sanniliga, menniskjunum tað, ið er rætt, og forbjóðar øllum tí, ið lækkar støði teirra.

34.

Tú skalt vita, at sambært tí, ið Harri tín, Harrin yvir øllum menniskjum, hevur fyriskipað í bók sínari, hava tær vælvildir, ið Hann hevur sýnt mannaættini, verið, og fara altíð at verða verandi, markleysar í vavi. Hin fyrsta og fremsta millum hesar vælvildir, ið hin almáttugi hevur veitt menniskjuni, er skynsemisgávan. Ætlan Hansara við at geva eina slíka gávu, er eingin onnur uttan at gera skapning sín føran fyri, at kenna og viðurkenna hin eina sanna Guð - upphevjað veri dýrd Hansara. Hendan gáva gevur menniskjuni megi til at skilja sannleikan í øllum lutum, og førir hana til tað, ið rætt er, og hjálpir henni at avdúka loyndarmál skapaninnar. Næst eftir hesa gávu kemur

sjóngávan, sum gevur menniskjum megi at síggja. Hetta er høvuðsamboðið, sum vit og skil hennara nýtir til virki sítt. Sansir hoyrnunnar og hjartans, og aðrir tílíkir, skulu á sama hátt roknast millum tær gávur, sum mannalikamið hevur fingið í sín lut. Ómetaliga upphevjaður er hin almáttugi, sum hevur skapað hesar førleikar, og opinberað teir í likami menniskjunnar.

Hvør einasta av hesum gávum er eitt óreingiligt prógv um hátign, megi, vald, altfevnandi kunnleika hins eina sanna Guðs - upphevjað veri dýrd Hansara. Hugsa um følisansin. Ver vitni til hvussu megi hansara hevur breitt seg út um alt mannalikamið. Ímeðan førleikar sum sjón og hoyrn hvør sær eru staðfestir í einum ávísum miðdepli, so fevnir følisansurin um alt mannaskapilsið. Heiðrað veri megi Hansara, lovprísað veri fullveldi Hansara!

Hesar gávur liggja í menniskjuni sjálvari. Tann, ið er hin framúrskarandi oman fyri allar aðrar gávur, hvørs náttúra er óspillandi, og sum er partur av Guði sjálvum, er gávan av guddómligari opinbering. Hvør einasta gáva, ið skaparin hevur givið menniskjuni, veri hon likamlig ella andalig, er undirgivin hesari. Hon er, í kjarna sínum, breyðið, ið kemur niður av himni og fer altíð at verða verandi soleiðis. Hon er størsti vitnisburður Guðs, klárasta váttan um sannleika Hansara, tekinið um fullfíggjaða gávumildi Hansara, merkið um altfevnandi miskunn hansara, prógvið um mest elskandi forsjón Hansara, ímyndin av mest fullkomna hásinni Hansara. Tann ið hevur kent aftur birting Hansara á hesum degi hevur, av sonnum, fingið lut í hesi hægstu gávu Guðs.

Veit Harra tínum tøkk fyri at hava givið tær eina so stóra gávu. Hevja rødd tína og sig: Øll lovprísan veri Tær, O Tú tráanin hjá hvørjum hjarta, sum skilir!

35.

Sig: O trúarleiðarar! Vigið ikki bók Guðs við slíkum vísindum og eftir slíkum mátingareindum, ið eru vanlig tykkara millum, tí bókin sjálv er hin óreingjandi vágskálin, ið er grundfest millum menniskjuni. Á hesari mest fullkomnu vágskál má alt tað vigast, ið ættir og fólkasløg jarðar eiga, meðan tyngdarvirði hennara eigur at verða roynt í mun til hennara egna mátistokk, høvdu tit bert vitað tað.

Eyga kærleika Míns grætur sárt um tykkum, av tí at tit ikki hava kent Hann aftur, sum tit hava ákallað um dagin og á náttartíð, um kvøldið og á morgni. Takið tykkum fram, O fólk, við snjóhvítum andlitum og geislandi hjørtum, til hin vælsignaða og skarlaksreyða blett, har Sadratu' l - Muntahá kallar: "Sanniliga, tað er eingin annar Guð uttan Eg, alvaldandi verjin, hin sjálvuppihaldandi!"

O tit trúarleiðarar! Hvør er tann ímillum tykkum, ið kann standa seg ímóti Mær í víðskygni ella innliti? Hvar er tann at finna, ið torir at siga seg vera Mín javnlíka í orðum ella vísdómi? Nei, við Harra Mínum, hinum almiskunnsama! Alt á foldum skal farast; og hetta er andlit Harra tykkara, hins almáttuga, hins elskaða.

Vit hava fyriskipað, O fólk, at tann hægsti og endaligi av øllum lærdómum er viðurkenningin av Honum, sum er miðið fyri allari vitan; og kortini, síggið hvussu tit hava loyvt lærdómi tykkara at stongt tykkum úti, eins og við einum sløri, frá Honum, sum er degningurin av hesum ljósi, sum hevur gjørt hvønn tann einasta loynda lut sjónligan. Um tit bert høvdu funnið kelduna, sum ljómin úr hesari framsøgn er spríktur úr, so høvdu tit vrakað fólk heimsins og alt tað, ið tey eiga, og høvdu nærkað tykkum hesum mest vælsignaða sæti dýrdarinnar.

Sig: Hetta er, sanniliga, himmalin, har móðurbókin er varðveitt, kundu tit bert fatað tað. Tað er Hann, sum hevur fingið klettin at rópa, og tann brennandi runnin at hevja rødd sína á tí fjalli, ið hevjar seg upp um hitt heilaga landið, og fingið tey at kunngera: "Kongsríkið er Guðs, hins hægsta Harra alra, hins almáttmikla, hins kæra!"

Vit hava ikki gingið í nøkrum skúla, ei heldur lisið nakrar av ritgerðum tykkara. Lurtið eftir orðunum hjá hesum ólærda, hesi orð nýtir Hann til tess at kalla tykkum saman til Guð, Hin sum um ævir skal vera. Betri er hetta fyri tykkum enn allir dýrgripir jarðarinnar, kundu tit bert fatað tað.

36.

Tað hvílir á tær, og á teimum, ið fylgja Honum, sum er hin ævigi sannleikin, at kalla saman øll menniskju til tað, ið skal halga tey frá øllum tilknýti til lutir jarðarinnar, og sum skal reinsa óreinsku hennara burturav teimum, so at søti angin frá klæðum hins aldýrdarríka kann kennast á øllum teimum, ið elska Hann.

Tey, ið eiga ríkidømi, mugu tó sýna størsta umhugsni mótvegis teimum fátøku, tí stórur er heiðurin, ið Guð ætlar teimum fátøku, ið eru óvikandi í tolni. Við lívi Mínum! Tað er eingin heiður, uttan tann, sum Guði kundi hóvað at veitt, ið kann samanberast við hendan heiður. Stór er tann sæla, ið bíðar teimum fátøku, sum halda á í tolsemi og fjala líðingar sínar, og væl er tað vorðið teimum ríku, ið veita teimum neyðstøddu ríkidømi sítt, og taka tey framum seg sjálvi.

Guð gævi, at tey fátøku mega kýta seg og stremba eftir at vinna sær ráðini til lívsins uppihald. Hetta er ein skylda, sum, í hesari mest stórfingnu opinbering, er áløgd hvørjum einstøkum, og er í Guðs eygum mett sum ein stórur gerningur. Hvør tann, ið gevur hesari skyldu gætur, honum fer hjálp hins ósjónliga við vissu at stuðla. Hann kann ríka, av hásinni sínum, ein og hvønn, Hann hevur hug til. Hann hevur, sanniliga, vald yvir øllum....

37.

Ætlanin, ið liggur undir opinberingini av hvørjari tí einastu himmalsku bók, ja, av hvørjum tí einasta guddómliga opinberaða versi, er at geva øllum menniskjunum skil fyri rættvísi og at geva teimum fatan, so at friður og ró mega verða væl tryggjað millum teirra. Alt tað, ið gróðursetur vissu í hjørtu menniskjunnar, alt tað, ið hevjar støði teirra ella fremur nøgdsemi teirra, er kærkomið í eygum Guðs. Himmalhøgt er tað støði, ið menniskjan kann náa, um hon bert velur at fullgera høgu lagnu sína! Og djúpt, djúpt kann hon søkka í dýpini av vanæru og eyðmýking, dýpi, ið sjálvt tey lægstu av kriatúrunum ongantíð hava rokkið! Takið, O vinir, møguleikan, ið hesin dagur bjóðar tykkum, og latið ikki tykkara egna vansketni ræna frá tykkum gávumilda streymin av náði Hansara. Eg bøni Guð um, at Hann náðiliga fer at gera hvønn einstakan av tykkum føran fyri at prýða seg sjálvan, við prýðislutunum av reinum og heilagum gerðum, á hesum sæla degi. Hann ger, sanniliga, alt tað, ið Honum hóvar.

38.

Gevið ljóð, O fólk, og lýðið á tað, ið Eg, av sonnum, sigi tykkum. Hin eini sanni Guð, upphevjað veri dýrd Hansara, hevur altíð mett, og fer áhaldandi at meta, mannahjørtuni sum egnu, serstøku ogn sína. Alt annað, hvørt tað er á landi ella sjógvi, hvørt tað er ríkidømi ella heiður, hevur Hann latið kongum og valdsharrum jarðarinnar í arv. Frá byrjanini, ið onga byrjan hevur, er fánin, ið kunnger orðini "Hann ger alt tað, ið Hann hevur hug til", breiddur út í øllum ljóma sínum fyri birting Hansara. Tað, ið mannaættini tørvar á hesum degi, er lýdni móti teimum, ið sita við valdið, og eitt fast tak í línu vísdómsins. Tey amboð, ið eru altumráðandi fyri bráðfeingisverju mannaættarinnar, og fyri trygd og trygging hennara, eru litin upp í hendurnar á, og eru í valdinum hjá teimum, ið ráða í mannasamfelagnum. Hetta er ynski Guðs og fyriskipan Hansara.
.... Vit vóna inniliga, at ein av kongum jarðarinnar fer, fyri sakir Guðs, at reisast fyri sigrinum hjá hesum misbjóðaða, hesum kúgaða fólki. Ein slíkur kongur fer um ævir at verða lovsungin og

heiðraður. Guð hevur álagt hesum fólki skylduna, at stuðla hvørjum tí, ið stuðlar teimum at tæna bestu áhugamálum hansara, og at vísa honum varandi trúfesti teirra. Tey, ið fylgja Mær mugu stremba eftir, undir øllum umstøðum, at fremja vælferðina hjá hvørjum tí, ið reisist fyri sigrinum hjá míni søk, og mugu til allar tíðir prógva kærleika og trúskap teirra til hansara. Sælur er tann, ið lurtar eftir og gevur ráðum Mínum gætur. Vei honum, ið ikki ger eftir ynski Mínum.

39.

O tit fólkasløg heimsins! Vitið, sanniliga, at ein óvæntað vanlukka, fylgir tykkum, og at ræðulig revsing bíðar tykkum. Haldið ikki, at gerningar tykkara eru skavaðir burtur úr sjón Mínari. Við fagurleika Mínum! Allar gerðir tykkara hevur pennur Mín rist við óduldum stavum í talvur úr krysolitti.

40.

Hin alvitandi læknin hevur fingur sín á lívæðraslátti mannaættarinnar. Hann kennir sjúkuna og fyriskrivar heilivágin, í sínum ósvitandi vísdómi. Hvør øld hevur sín egna trupulleika, og hvør sál sína serstøku stundan. Tann heilivágur, ið heiminum tørvar í líðingunum á hesum degi, kann undir ongum umstøðum vera hin sami, sum tann, ið ein komandi øld kann hava tørv á. Gevið gjølla gætur eftir tørvinum hjá tí øld, ið tit liva í, og savnið hugsanir tykkara um krøv og fortreytir hennara.

Vit duga væl at síggja hvussu øll mannaættin er umgyrd av stórum, av ómetaligum líðingum. Vit síggja hana langtandi á sjúkralegu sínari, hart roynda og vónsvikna. Tey, ið eru rúsaði av innbilskni hava lagt seg sjálvi ímillum hana og hin guddómliga og lýtaleysa læknan. Verið vitni til, hvussu tey hava fløkt øll menniskju, eisini seg sjálvi, inn í meskarnar á teirra egnu snildum. Tey eru hvørki før fyri at finna orsøkina til sjúkuna, ei heldur hava tey nakran kunnleika um heilivágin. Tey hava ímyndað sær tað beina at vera skeivt, og hava hugsað sær vin teirra sum ein fígginda.

Lurtið eftir søta vælljóðinum hjá hesum fanga. Reisist, og hevjið røddir tykkara, so at tey, ið eru í fasta svøvni, kanska mega verða vakt. Sigið: O tit, ið eru eins og deyð! Hondin av guddómligum gávumildi bjóðar tykkum vatn lívsins. Skundið tykkum og drekkið ríviliga. Hvør tann, ið er endurføddur á hesum degi, fer ongantíð at doyggja; hvør tann, ið verður verandi deyður, fer ongantíð at liva.

41.

Hann, sum er Harri tín, hin almiskunnsami, tráar í hjarta sínum eftir, at síggja alla mannaættina sum eina sál, og eitt likam. Skundið tit tykkum, at fáa lut tykkara av ríkiligu náði og miskunn Guðs á hesum degi, ið skuggar fyri øllum øðrum skaptum døgum. Stór er tann eydna, ið bíðar honum, ið sleppur øllum tí, sum hann hevur, í tráan eftir at ogna sær tað, ið er av Guði! Ein slíkur er millum Guðs sælu, um hetta bera Vit vitnisburð.

42.

Vit hava ásett tykkum eina tíð, O fólkasløg. Um tit ikki, á tí avgerandi tíma, venda tykkum móti Guði, so fer Hann, sanniliga, at revsa tykkum harðliga, og fer at lata ræðuligar líðingar raka tykkum úr øllum ættum. Av sonnum sigi eg tykkum; ógvisligur verður tann agi, sum Harri tykkara tá fer at tykta tykkum við!

43.

Hin stóra veran sigur: O tit, mannabørn! Grundleggjandi ætlanin, ið kveikir trúgv Guðs og átrúnað Hansara, er at tryggja áhugamálini og at fremja eindina av mannaættini, og at nøra um anda kærleikans og vinalagsins manna millum. Latið hana ikki gerast keldu til stríð og ósemju, hatur og fíggindaskap. Hetta er hin beini vegurin, hitt fasta og óvikandi grundarlagið. Alt tað, ið er reist á hesum grundarlagi, kunnu broytingar og tilvildir heimsins ongantíð fáa at vikna í styrki, ei heldur fer kollveltingin av óteljandi øldum, at bróta niður bygnað tess. Tað er Okkara vón, at átrúnaðarligu leiðarar heimsins, og valdsharrar hansara, í felag reisast fyri siðabótini av hesari tíð og fyri uppreisingini av eydnu hennara. Latið teir, aftaná at hava hugsað djúpt um tørv hennara, leggja ráð saman, og, gjøgnum gjølla og fullfíggjaða umrøðu, geva einum sjúkum og hart royndum heimi tann heilivág, ið hann hevur fyri neyðini.... Tað hvílir á teimum, ið sita við valdið, at fara fram við hógvi í øllum málum. Alt tað, ið fer út um markið fyri hóvsemi, heldur uppat við at hava gagnligt árin. Hugsið til dømis um sovorðið sum frælsi og siðmenning. Hvussu nógv skynsamir menn so líta at teimum við tokka, fara tey, um tey verða drivin til evsta mark, at hava skaðiligt árin á menniskjuna.... Guð gævi, at fólkasløg heimsins, vegna tær miklu strembanir, ið eru útinntar av stjórnarum teirra, og teimum vísu og lærdu millum manna, mega verða fingin at varnast tað, ið er til teirra egna besta. Hvussu leingi ætlar mannaættin sær at halda á við sjálvræði sínum? Hvussu leingi skal órættvísi standa við? Hvussu leingi skulu ruðuleiki og ráðaloysi valda millum manna? Hvussu leingi skal ósemja gera andlit samfelagsins óttafult? Áh! Vónloysisvindar blása úr øllum ættum, og stríðið, ið syndrar og plágar mannaættina økist dagliga. Teknini um komandi skelvingar og ruðuleika síggjast nú týðiliga, við tað at ráðandi skipanin tykist at vera syndarliga óhjálpin. Eg bøni Guð, upphevjað veri dýrd Hansara, um at Hann náðiliga fer at vekja fólkasløg jarðarinnar, at Hann fer tryggja, at endin á atburði teirra fer at gagna teimum, og fer at hjálpa teimum at fullgera tað, ið sømir seg støði teirra.

44.

Lítið at teimum ónáðum, sum, í mong drúgv ár, hava plágað jørðina, og tí órógv, ið er komin á fólk hennara. Hon er antin vorðin herjað av kríggi, ella pínd av knappligum og óvæntaðum vanlukkum. Hóast sorg og neyð ringir seg um heimin, so er eingin steðgaður á til tess at hugsa um hvør orsøkin ella upprunin til hetta kann vera. Hvørja ferð hin sanni ráðgevin mælti eitt orð til ávaringar, avnoktaðu tey Hann øll, sum var hann ein ófriðarkroppur og tey vístu frá sær tað, ið Hann setti fram. Ørvitisligur, óskiljandi er slíkur atburður! Tú finnur ikki tveir menn, ið kunnu sigast at vera sameindir bæði fyri øðrum at síggja og innaní sær sjálvum. Prógvini um stríð og óndskap eru sjónlig allastaðni, hóast øll vórðu skapað til eind og samljóð. Hin stóra veran sigur: O tit, høgt elskaðu! Tjaldtempul eindarinnar er reist; metið ikki hvønn annan sum ókunnufólk. Tit eru fruktirnar av einum træi, og bløðini á einari grein. Vit vóna inniliga, at rættvísisljósið fer at skína á heimin, og halga hann frá harðræði. Um stjórnarar og kongar jarðarinnar, ímyndirnar av megi Guðs, upphevjað veri dýrd Hansara, reisast og gera av, at víga seg sjálvar til tað, ið fer at fremja tey hægstu áhugamálini hjá allari mannaættini, so fer rættvísisstýrið vissuliga at verða skipað millum mannabørnini, og glampin frá ljósi tess fer at fevna um alla jørðina. Hin stóra veran sigur: Bygnaðurin av trygd og skipan heimsins er reistur á, og fer áhaldandi at verða borin av, súlum afturløningar og revsingar.... Í einum øðrum broti hevur Hann skrivað: Ansið tykkum, O fylking av stjórnarum heimsins! Tað er eingin makt á jørð, sum í sigrandi megi sínari kann meta seg við makt rættvísinnar og vísdómsins.... Sælur er tann kongur, sum gongur í hergongu við fána vísdómsins breiddum út fyri sær, og við herdeildum rættvísinnar hópaðum saman aftanfyri seg. Hann er sanniliga tað prýði, ið skrýðir enni friðarins og andlitsbragd tryggleikans. Tað kann als eingin ivi vera um, at um morgunstjørna rættvísinnar, sum harðræðisskýggj hava fjalt, hevði lýst ljós sítt á menniskjuni, so hevði yvirflati jarðarinnar verið fullkomiliga umskapaður.

45.

O kongar kristindómsins! Hoyrdu tit ikki orð Jesusar, anda Guðs, "Eg fari burtur, og komi aftur til tykkara"? Hvussu ber tað tá til, at tit, tá ið Hann enn einaferð kom til tykkara í skýggjum himmalsins, ikki nærkaðust honum, so at tit kundu skoða andlit Hansara, og verið millum teirra, ið náddu hjáveru Hansara? Í einum øðrum broti sigur Hann: "Tá ið Hann, andi sannleikans, kemur, fer Hann at leiða tykkum til allan sannleika." Og kortini, síggið hvussu tit sýttu fyri at venda andlitum tykkara móti Honum, og treiskliga hildu fram við at stuttleika tykkum við skemtanum og sveimanum tykkara, tá ið Hann so gav tykkum sannleikan. Tit tóku ikki ímóti Honum, ei heldur leitaðu tit til hjáveru Hansara, so at tit kundu hoyrt vers Guðs úr egna munni Hansara, og fingið lut í margfalda vísdómi hins almáttuga, hins aldýrdarríka, hins alvísa. Orsakað av mistaki tykkara, hava tit forðað fyri at andadráttur Guðs var borin til tykkara, og tit hava hildið søtleikan í anga hansara burturi frá sálum tykkara. Tit halda áfram við at sveima av frøi í dalinum av tykkara spiltu tráanum. Tit, og alt sum tit eiga, skulu farast. Tit skulu, vissuliga, venda aftur til Guðs, og skulu verða kravd til svars fyri gerðir tykkara í hjáveru Hansara, sum skal savna saman alla skapanina....

46.

Hin stóra veran hevur, í ynski sínum um at opinbera fortreytirnar fyri friði og ró heimsins og fyri framgongd fólks hansara, skrivað: Tann tíðin má koma, tá ið tann bráðneyðugi tørvurin á at halda ein ovurstóran, ein altfevnandi savnandi fund, verður sannkendur um allan heimin. Tað er av ómetaligum týdningi at stjórnarar og kongar jarðarinnar mugu luttaka á honum, og við sínari luttøku í kjakinum mugu teir umhugsa slík ráð og tiltøk, ið mega leggja lunnar undir heimsins mikla frið millum manna. Ein slíkur friður krevur, at tey stóru veldini mugu samtykkja at sættast fullkomiliga hvønn við annan, so at ró kann valda millum fólk jarðarinnar. Skuldi nakar kongur tikið til vápnanna ímóti einum øðrum, so skulu allir sameindir reisast og steðga honum. Um hetta verður gjørt, fara tjóðir heimsins ikki longur at hava tørv á nøkrum hervaldi, uttan til tess at varðveita trygdina í teirra egna ríki og til at halda skil á viðurskiftunum innanfyri teirra landaøki. Hetta fer at tryggja frið og náðir hjá hvørjari ætt, stjórn og tjóð. Vit vóna inniliga, at kongar og stjórnarar jarðarinnar, speglið av miskunnsama og almáttuga navni Guðs, mega náa hetta støði, og verja mannaættina móti hørðu atsóknini frá harðræði.... Tann dagur nærkast, tá ið øll fólkasløg heimsins fara at hava tikið eitt alheims tungumál og eina felags skrift í nýtslu. Tá ið hetta er framt, verður tað soleiðis, at sama hvønn bý maður ferðast til, so skal tað vera sum trínur hann inn í egna heim sítt. Alt hetta er skyldubundið og fullkomiliga avgerandi. Tað hvílir á einum og hvørjum við innliti og skili, at stremba eftir at fremja tað í verki, sum er skrivað... Ein slíkur er av sonnum ein, sum í dag vígur seg sjálvan til tænastuna fyri allari mannaættini. Hin stóra veran sigur: Sælur og glaður er tann, ið reisist at fremja tað, sum gagnar fólkasløgum og ættum jarðarinnar. Í einum øðrum broti hevur Hann kunngjørt: Tað sømir seg ikki honum, ið elskar egna land sítt, at vera errin, men heldur honum, ið elskar allan heimin. Jørðin er eittans land, og mannaættin íbúgvar tess.

47.

O tit jarðarinnar stjórnarar! Hví hava tit skuggað fyri sólarinnar geislum, og forðað henni í at skinið? Lurtið eftir teimum ráðum, ið pennur hins hægsta hevur givið tykkum, so at kanska bæði tit og tey fátøku mega vinna ró og frið. Vit bøna Guð um, at stuðla kongum jarðarinnar í at skipa frið á jørð. Hann ger, sanniliga, tað sum Hann hevur hug til.

O kongar jarðarinnar! Vit síggja tykkum á hvørjum ári økja nýtslu tykkara, og leggja byrðuna av nýtslu tykkara á tegnar tykkara. Hetta er, sanniliga, fullkomiliga og skammiliga órættvíst. Óttist suffini og tárini hjá hesum misbjóðaða, og leggið ikki tungar byrðar á fólk tykkara. Stjalið ikki frá teimum fyri at reisa tykkum sjálvum borgir; nei, ynskið teimum heldur tað, ið tit høvdu ynskt tykkum sjálvum. Soleiðis leggja Vit tað víðopið fyri eygum tykkara, ið gagnar tykkum, um tit bert fata. Fólk tykkara eru dýrgripir tykkara. Ansið tykkum, at stýri tykkara ikki brýtur boð Guðs, og at tit ikki lata umsiting tykkara í ránsmannahendur. Við teimum stýra tit, við ráðum teirra eru tit til, við stuðuli teirra hertaka tit. Og kortini líta tit at teimum við vanvirðing! Hetta er løgið, sera løgið!

Nú tit hava vrakað hin miklasta friðin, haldið tit fast í hesum, hinum minna friðinum, so at kanska tit í ein ávísan mun mega betra egnu støðu tykkara, og ta hjá tegnum tykkara.

O jarðarinnar harrar! Sættist við hvønn annan, so at tit ikki hava fyri neyðini størri hervald, enn nóg mikið til at verja lond og øki tykkara. Ansið tykkum, at tit ikki lítilsvirða ráðgeving hins alvitandi, hins trúfasta.

Verið sameindir, O kongar jarðarinnar, tí harvið fer ódnin av ósemju at blíðka tykkara millum, og fólk tykkara fer at finna hvíld, um tit eru millum teirra, ið fata. Skuldi nakar tykkara millum tikið til vápnanna ímóti einum øðrum, reisist so allir ímóti honum, tí hetta er einki uttan týðiligt rættvísi.

48.

O tit, valdu umboð fólksins í hvørjum landi! Leggið tit ráð saman, og havið bert tað fyri eyga, ið gagnar mannaættini, og sum bøtir um støðu hennara, um tit teljast millum teirra, ið granska gjølliga. Lítið at heiminum, sum var hann mannalikam, ið, av ymsum ávum, varð rakt av ringum brekum og sjúkum, hóast tað á skapanardegi sínum var frískt og fullkomið. Ikki ein tann einasta dag fekk tað linna, nei, sjúka tess gjørdist bert meira hættislig, tá ið tað kom undir viðgerðina hjá óvitandi læknum, ið góvu egnu tráanum sínum fríar ræsur, og sum hava mistikið seg ræðuliga. Og um ein limur á hesum likami varð grøddur einaferð, orsakað av røktini hjá einum dugnaligum lækna, so hevði restin framvegis verið eins illa plágað og frammanundan. Soleiðis upplýsir hin alvitandi, hin alvísi tykkum.

Á hesum degi síggja Vit tað liggja í hondunum á stjórnarum, ið eru so deyðadruknir av errinskapi, at teir ikki megna at síggja týðiliga tað, ið er til teirra egna størsta gagn, og í enn minni mun viðurkenna eina opinbering, ið er so ørkymlandi og avbjóðandi sum hendan. Og hvørja ferð ein teirra hevur strembað eftir at bøta um støðu tess, hevur ætlan hansara verið at tryggja sær sjálvum vinning, um hann so viðgongur tað ella ikki; og júst vantandi sómin í hesari ætlan hevur avmarkað megi hansara at grøða ella lekja.

Tað, ið Harrin hevur fyriskipað sum tann máttmiklasta heilivágin og tað mætasta amboðið til grøðing heimsins, er sameiningin av øllum fólkasløgum hansara í eina alfevnda søk, eina felags trúgv. Hetta kann á ongan hátt fremjast, uttan við megini hjá einum dugnaligum, einum almáttugum og íblástum lækna. Hetta er, sanniliga, sannleikin, og alt annað er einki uttan villa.

49.

O Mín bróðir! Tá ið ein sannur leitari ger av, at taka leitanarstigið á teirri gøtu, ið førir til kunnleikan um hin fyrndargamla, má hann, fyrst av øllum, reinsa fjalandi dustið, sum er allur fingin kunnleiki, burtur úr hjarta sínum, ið er sætið hjá opinberingini av innaru loyndarmálum Guðs. Og hann má sópa alt tað, sum ber brá av ímyndum av djevulsligari trá, burtur úr hjarta sínum, Hann má reinska alla dálkan burtur úr brósti sínum, ið er halgidómurin av varandi kærleika hins elskaða, og hann má halga sál sína frá øllum, ið er úr vatni og leiri, og frá øllum óveruligum og stokkutum bondum. Hann má reinsa hjarta sítt so vandaliga, at eingin leivd av kærleika ella hatri verður

verandi í tí, so at ikki kærleikin blint førir hann til villu, ella hatrið rekur hann burtur frá sannleikanum. Rætt soleiðis sum tú sært tað henda á hesum degi, at fólk flest, orsakað av slíkum kærleika og hatri, hava mist hitt ódeyðiliga andlitið úr eygsjón. Tey eru vilst langt burtur frá ímyndunum av guddómligu loyndarmálunum, og uttan hirða reika tey gjøgnum oyðimørk gloymskunnar og villunnar.

Hesin leitari má, til allar tíðir, seta álit sítt á Guð, má avnokta fólk jarðarinnar, má loysa seg frá heimi dustsins, og halda fast í Honum, sum er Harri harranna. Hann má ongantíð royna at hevja seg sjálvan upp um nakran annan, hann má skola burtur hvørt eitt einasta vet av stoltleika og fáfongd av hjartatalvu sínari, hann má halda fast við tol og afturhaldni, vera tigandi og halda seg frá innantómum tosi. Tí tungan er ein gløðandi eldur, og óhógv í talu eitt drepandi eitur. Evnisligur eldur tærir likamið, meðan eldur tungunnar etur upp bæði hjarta og sál. Megin hjá hinum fyrra varir bert eina stund, meðan árinini av hinum seinna vara eina øld.

Hesin leitari eigur eisini at meta bakbíting sum álvarsliga villu, og halda seg sjálvan langt burtur frá ræði hennara, tí at bakbíting sløkkir ljós hjartans, og køvir lív sálarinnar. Hann eigur at vera nøgdur við smátt, og at vera leysur av øllum ótálmaðum tráanum. Hann eigur at hámeta vinalag teirra, ið hava avnoktað heimin, og meta tað at sleppa undan reypandi og verðsligum fólki, sum ein dýrabaran fyrimun. Í lýsingini á hvørjum degi eigur hann at tala í trúnaði við Guð og við allari sál sínari eigur hann at halda á í leitanini eftir sínum elskaða. Hann eigur at tæra hvønn einasta sjálvrádna tanka við loganum í kærleiksfullu umtalu Hansara, og skjótur sum snarljósið skal hann fara framvið øllum øðrum uttan Honum. Hann eigur at hjálpa teimum, ið mistu ognir sínar, og ongantíð eigur hann at himprast við at sýna vælvild, mótvegis teimum neyðstøddu. Hann eigur at vísa góðvild mótvegis djórum, og tá uppaftur meira mótvegis sínum medmenniskjum, ið hava fingið megi til at tala. Hann eigur ikki at ivast í at geva lív sítt fyri sín Elskaða, ei heldur at loyva atfinningum fólksins at venda sær burtur frá sannleikanum. Hann eigur ikki at ynskja øðrum tað, ið hann ikki ynskir sær sjálvum, ei heldur lova tað, ið hann ikki heldur. Av øllum hjarta sínum eigur hann at skýggja felagskap við illgerðarfólk, og biðja fyri fyrigeving synda teirra. Hann eigur at fyrigeva tí syndafulla, og ongantíð vanvirða lága støði hansara, tí eingin veit hvør endin á einum sjálvum verður. Mangan hevur ein syndari rokkið fram at kjarnanum av trúgv, í deyðans stund, og í tí hann kulkar hin ódeyðiliga drykkin í seg, hevur hann hevjað seg upp til fylkingina í tí høga! Og hvussu mangan hevur ikki ein frómur trúgvandi, í løtuni tá ið sál hansara skal gera himmalsferð sína, verið so broyttur, at hann er fallin í tann djúpasta eldin!

Ætlan Okkara við at opinbera hesar sannførandi og fyndigu frameringar, er at prenta inn í tann leitandi, at hann skal meta alt uttan Guð sum stokkut, og rokna alt uttan Hann, sum er miðið fyri allari tilbiðjan, sum tann bera einkisleika.

50.

Sigið: O fólk Bahás, lærið tit onnur um søk Guðs, tí Guð hevur álagt hvørjum einstøkum skylduna at kunngera boðskapin, og metir hesa sum ta mest rósverdu av øllum gerðum. Ein slík gerð er einans nýtilig, tá ið tann, ið lærir frá sær søkina, frammanundan trýr fast á Guð, hin hægsta verjan, hin miskunnsama, hin almáttuga. Hann hevur, harumframt, fyriskipað, at søk Hansara skal boðast við frameringarmegi menniskjunnar, og ikki við harðskapi. Soleiðis er fyriskipan Hansara send niður úr kongsríki Hansara, sum er hin mest upphevjaði, hin alvísi. Ansið tykkum, at tit ikki stríðast við nakran, nei, strembið eftir at gera hann varugan við sannleikan við vinaligum atburði og sannførandi tileggjan. Um áhoyrari tykkara tekur við, so hevur hann tikið við, sær sjálvum at gagni, og ger hann tað ikki, vendið tykkum so burtur frá honum, og vendið andlitum tykkara mótvegis heilaga hovi Guðs, sæti ljómandi heilagleikans.

Klandrist ikki við nakran um lutir og viðurskifti sum hoyra hesum heimi til, tí Guð hevur latið tey liggja eftir til teirra, ið hava lagt alsk sín á tey. Av øllum í heiminum hevur Hann kannað sær sjálvum mannahjørtuni - hjørtu, ið herskararnir av opinbering og frambering kunnu sigra á. Soleiðis er tað fyriskipað av fingrum Bahás, á talvuni av óbroytandi avgerðum Guðs, eftir boðum Hansara, sum er hin hægsti fyriskiparin, hin alvitandi.

51.

Ver gávumildur í góðlukku og takksamur í mótburði. Ver verdugur at eiga álitið hjá granna tínum, og hygg at honum við bjørtum og vinaligum andliti. Ver ein dýrgripur fyri hin fátæka, ein áminnari fyri hin ríka, ein ið svarar rópi hins treingjandi, og varðveit heilagleikan í lyfti tínum. Ver reiðiligur í tínum dómi og ansin í tínari talu. Ver ikki órættvísur móti nakrari menniskju, og sýn mesta spaklyndi móti øllum menniskjum. Ver sum ein lampa fyri tey, sum ganga í myrkri, ein gleði fyri tey sorgarbundnu, eitt vatn fyri tey tystu, ein havn fyri tey niðurboygdu, ein stuðul og verji fyri offur kúgarinnar. Lat falsloysi og reiðileika eyðkenna allar tínar gerðir. Ver eitt heim fyri hin fremmanda, ein salva fyri hin líðandi, eitt styrkisins torn fyri hin flýggjandi. Ver eygu fyri hin blinda og eitt leiðbeinandi ljós fyri fótum hins vilsta. Ver eitt prýði fyri ásjón sannleikans, ein krúna fyri pannu trúskapsins, ein súla í rættvísistemplinum, ein lívsins andi fyri likam mannaættarinnar, eitt merki fyri herlið rættvísinnar, ein stjørna yvir havsbrúgv dugnaskapsins, døgg fyri mold mannahjartans, ein ørk á stórhavi kunnleikans, ein sól á himni gávumildsins, ein gimsteinur á ennisprýði vísdómsins, eitt skínandi ljós á himnahválvinum hjá tínum ættarliði, ein frukt á træi eyðmýktsins.

52.

Tann fyrsta og tann fremsta skyldan, ið er áløgd menniskjunum, aftaná viðurkenningina av Honum, sum er hin ævigi sannleikin, er skyldan at vera støðufastur í søk Hansara. Halt tú fast við hana, og ver millum teirra hvørs hugar eru væl festir og grundaðir á Guð. Eingin gerningur, hvussu rós verdur hann so er, kann nakrantíð samanberast við hendan. Hann er kongur alra gerninga, og um hetta vil Harri tín, hin allarhægsti, hin mest máttmikli, bera vitnisburð....

Tær dygdir og tey eyðkenni, ið hoyra Guði til, eru øll eyðsýnd og sjónlig, og eru nevnd og lýst í øllum teimum himmalsku bókunum. Teirra millum eru álitisføri, sannføri, hjartareinleiki, meðan tú talar við Guð, várkunn, tað at lata sær lynda alt tað, ið hin almáttugi hevur fyriskipað, nøgdsemi við tað, ið vilji Hansara hevur veitt, tol, nei, takksemi í roynslunnar stund, og fullkomið álit, undir øllum umstøðum, á Hann. Hesir teljast, sambært meting Guðs, millum teir hægstu og mest rós verdu av øllum gerningum. Allir aðrir gerningar eru, og fara altíð at vera, av minni týdningi og undirgivnir teimum....

53.

Við reiðileika Guðs! Heimurin og fáfongdir hansara, og heiður hansara, og allar tær gleðir, ið hann kann bjóða, eru øll, í eygum Guðs, eins virðisleys og, nei, uppaftur meira vanvirðislig enn, dust og øska. Gævi at mannahjørtuni kundu fata tað! Reinsið tykkum væl, O fólk Bahás, fyri dálkan heimsins, og øllum tí, ið er av honum. Guð sjálvur ber Mær vitnisburð. Lutir jarðarinnar søma seg tykkum illa. Kastið teir burtur til slík, ið mega tráa eftir teimum, og festið eygu tykkara á hesa mest heilagu og strálandi sjón.

Tað, ið sømir seg tykkum, er kærleiki Guðs og kærleiki Hansara, sum er birtingin av kjarna Hansara, og hald av øllum tí, ið Hann velur at áleggja tykkum, um tit bert vistu tað.

Sigið: Latið sannføri og kurteisi vera prýði tykkara. Loyvið ikki tykkum sjálvum at vera uttan búna várkunnar og rættvísinnar, so at søti angi heilagleikans kann verða borin frá hjørtum tykkara til allar skaptar lutir. Sigið: Ansið tykkum, O fólk Bahás, at tit ikki ganga vegir teirra, hvørs orð víkja frá teirra gerðum. Strembið eftir, at tit mega gerast før fyri at vísa fólki jarðarinnar tekin Guðs, og at endurspegla boð Hansara. Latið gerningar tykkara vera ein leiðvísara fyri alla mannaættina, tí játtanirnar hjá teimum flestu menniskjunum, veri tey høg ella lág, víkja frá atburði teirra. Tað er við gerðum tykkara, at tit kunnu skilja tykkum frá øðrum. Við teimum kann bjartleikin frá ljósi tykkara lýsa á alla jørðina. Glaður er tann, ið gevur ráðum Mínum gætur, og heldur tær fyriskipanir, ið eru fyriskrivaðar av Honum, sum er hin alvitandi, hin alvísi.

54.

Um tit møta teimum eyðmýktu og kúgaðu, vendið tykkum tá ikki vanvirðandi burtur frá teimum, tí kongur dýrdarinnar vakir yvir teimum og fevnir tey við slíkum eymleika, ið eingin kann fata uttan tey, ið hava latið ynski síni og tráanir sínar runnið saman við vilja Harra tykkara, hinum miskunnsama, hinum alvísa. O tit ríku á jørð! Flýggið ikki undan andliti hins fátæka, ið liggur í dustinum, nei, hjálpið honum heldur og latið hann greiða frá søgunum um tær sorgir, ið órannsakandi fyriskipan Guðs hevur latið hann verða raktan av. Við reiðileika Guðs! Meðan tit eru saman við honum fer fylkingin í tí høga at eygleiða tykkum, fer at biðja fyri tykkum, fer at lovsyngja nøvnum tykkara og hálova gerningi tykkara. Sæl eru tey lærdu, ið ikki rósa sær sjálvum av evnum sínum, og væl verður teimum reiðiligu, ið ikki háða tey syndafullu, men heldur fjala misgerðir teirra, so at teirra egnu ófullkomileikar mega verða verandi duldir fyri eygum menniskjunnar.

55.

Tað er Okkara ynski og bøn, at hvør tann einasti av tykkum kann gerast ein kelda av berari góðvild fyri menniskjunum, og eitt fyridømi um heiðursemi fyri mannaættini. Ansið tykkum, at tit ikki taka tykkum sjálvi framum næstar tykkara. Festið eygu tykkara á Hann, sum er tempul Guðs millum menniskjuni. Hann hevur, av sonnum, givið lív sítt sum loysigjald fyri endurloysn heimsins. Hann er, sanniliga, hin algávumildi, hin miskunnsami, hin hægsti. Um nakað stríð kyknar ímillum tykkum, síggið so Meg standa fyri andlitum tykkara, og gloymið skeivleikarnar hjá hvørjum øðrum fyri Mítt navns skuld, og sum eitt tekin um kærleika tykkara fyri opinberu og ljómandi søk Mínari. Okkum dámar væl at síggja tykkum til allar tíðir vera saman í vinalagi og semju í paradísi góðvilja Míns, og at anda í Okkum frá gerningum tykkara angan av vinalagi og eind, av kærleika og felagskapi. Soleiðis verður tað rátt tykkum til av hinum alvitandi, hinum trúfasta. Vit fara altíð at vera við tykkum; um Vit anda í Okkum luktilsið av felagskapi tykkara, fer hjarta Okkara vissuliga at fegnast, tí einki annað kann nøkta Okkum. Um hetta ber hvør maður við veruligum skili vitnisburð.

56.

Tá ið sigurin kemur, fer hvør maður at játta seg sjálvan sum ein trúgvandi, og fer at skunda sær til skýli trúar Guðs. Sæl eru tey, sum á døgunum av heimsumfevnandi mótburði hava staðið stinn í søkini og sýtt fyri at vikið frá sannleika hennara.

57.

Tey, ið hava slept heimlandi sínum til tess at læra frá sær søk Okkara - hesi fer hin trúfasti andin at styrkja við megi sínari. Eitt lið av Okkara útvaldu einglum fer at fylgjast við teimum, soleiðis sum teir eru bidnir av Honum, sum er hin almáttugi, hin alvísi. Stór er tann sæla, ið bíðar honum, ið hevur vunnið heiðurin at tæna tí almáttuga! Við lívi Mínum! Eingin gerningur, hvussu aðalborin hann so er, kann samanberast við hendan, uttan slíkar gerðir, ið eru fyriskipaðar av Guði, hinum almáttmikla, hinum mest velduga. Ein slík tænasta er, av sonnum, prinsurin av øllum góðum gerðum, og prýðið hjá hvørjum stórum gerningi. Soleiðis er tað fyriskipað av Honum, sum er hin hægsti opinberarin, hin fyrndargamli.

Hvør tann, ið reisist fyri at læra frá sær søk Okkara má avgjørt loysa seg sjálvan frá øllum jarðiskum, og má, til allar tíðir, meta sigurin hjá trúgv Okkara sum hægsta mál sítt. Hetta er, sanniliga, fyriskipað í hini vardu talvuni. Og tá ið hann ger av at fara frá heimbýli sínum, fyri skuld sakar Harra síns, lat hann leggja alt álit sítt á Guð, sum ta bestu trygd fyri ferð sínari, og klæða seg í kápu dygdanna. Soleiðis er tað fyriskipað av Guði, hinum almáttuga, hinum allovaða.

Um hann verður kyndur við eldi kærleika Hansara, um hann sigur frá sær allar skaptar lutir, so fara orðini, ið hann mælir, at festa í tey, ið hoyra hann. Sanniliga, Harri tín er hin alvísi, hin alupplýsti. Sælur er tann, ið hevur hoyrt rødd Okkara, og svarað kalli Okkara. Hann er, av sonnum, millum teirra, ið skulu verða leidd nær at Okkum.

58.

Hugsið um trongskygnið hjá hugum menniskjunnar. Tey biðja um tað, ið skaðar tey, og kasta burtur tað, ið gagnar teimum. Tey eru, av sonnum, millum teirra, ið eru vilst langt av leið. Vit síggja summi tráa eftir frælsi, og vera errin av tí. Slík eru í dýpum fákunnunar.

Frælsi má, í síðsta enda, føra til uppreistrarhuga, hvørs logar eingin megnar at sløkkja. Soleiðis verða tit ávaraði av Honum, sum er útroknarin, hin alvitandi. Tit skulu vita, at frælsi og ímynd tess, latið í hold, er djórið. Tað, ið sømir seg menniskjunum er, at geva seg undir slíkar avmarkingar, ið verja hana frá egnu fákunnu sínari, og tryggja hana ímóti meinunum frá ófriðarkroppinum. Frælsi fær menniskjuna at fara út um mørk siðsemis, og at minka um tignina í støði hennara. Tað fær hana niður á stigið av størstu siðspillu og óndskapi.

Lítið at menniskjunum, sum vóru tey eitt seyðafylgi, ið tørvar ein hirða at verja seg. Hetta er, vissuliga, sannleikin, hin vissi sannleiki. Vit góðkenna frælsi undir ávísum umstøðum, og sýta fyri at samtykkja tað undir øðrum. Vit eru, sanniliga, hin alvitandi.

Sigið: Satt frælsi er at vera undirgivin Mínum boðum, so lítið sum tit vita tað. Um menniskjuni høvdu hildið í tí, ið Vit hava sent teimum niður av himni opinberinganna, so høvdu tey, við vissu, rokkið fullkomnum frælsi. Sælur er tann, ið hevur fatað ætlan Guðs við øllum tí, ið Hann hevur opinberað úr himmali vilja síns, ið fyllir allar skaptar lutir. Sigið: Tað frælsi, ið gagnar tykkum, er ikki at finna nakrastaðni uttan í fullkomnari tænastu fyri Guði, hinum æviga sannleikanum. Hvør tann, ið hevur smakkað søtleika tess, fer at sýta fyri at býta tað um við alt ræði jarðar og himmalsins.

59.

Hvør tann, ið kannar sær eina opinbering beinleiðis frá Guði, áðrenn heili túsund ár eru gingin, er vissuliga ein lúgvandi falsari. Vit bøna Guð um, at Hann náðiliga fer at hjálpa honum at taka aftur í seg og venda sær frá slíkari framseting. Skuldi hann angra, fer Guð, uttan iva, at fyrigeva honum. Um hann, harafturímóti, heldur fast við villu sína, fer Guð, vissuliga, at senda niður ein, ið fer at fara náðileyst við honum. Ræðuligur, av sonnum, er Guð í revsing! Hvør tann, ið tulkar hetta ørindi øðrvísi enn eyðsýndi týdningur tess er, er uttan anda Guðs og náði Hansara, ið fevnir um allar

skaptar lutir. Óttist Guð, og fylgið ikki innantómu heilaspunum tykkara. Nei, fylgið heldur boðunum hjá Harra tykkara, hinum almáttuga, hinum alvísa.

60.

Sig: Sælur er tann durvandi, ið verður vaktur av loti Mínum. Sælur er tann lívleysi, ið kvaklast av Mínum lívskveikjandi andadráttum. Vælsignað er tað eyga, ið er troystað av at skoða vakurleika Mín. Sælur er tann ferðandi, ið stýrir fótafetum sínum móti tjaldtemplinum av dýrd og tign Míni. Sælur er tann eydnuleysi, ið søkir sær skjól undir skugganum av trónuhimli Mínum. Sælur er tann sárt tystandi, ið skundar sær til tey mjúkt floymandi vøtnini av miskunn Mínari. Sæl er tann ómettandi sál, ið kastar burtur sjálvsøknu tráanir sínar av kærleika til Mín og sessast við tað veitsluborð, ið Eg havi sent niður av himlinum av guddómligum gávumildi til Míni útvaldu. Sælur er tann eyðmýkti, ið hevur fast tak á línuni av dýrd Míni; og tann tørvandi, ið trýnur inn undir skuggan av tjaldtemplinum av ríkidømi Mínum. Sælur er tann fákunnumaður, ið sóknast eftir kelduni til kunnleika Mín; og tann dølski, ið krøkir seg fastan í strongin av áminning Mínari. Sæl er tann sál, ið er hevjað til lívs av eggjandi andadrátti Mínum, og hevur fingið atgongd inn í himmalska kongsríki Mítt. Sælur er tann maður, ið søti angin av endursameining við Meg hevur vakt og fingið at nærkast degninginum av opinbering Mínari. Vælsignað er tað oyra, ið hevur hoyrt, og tann tunga, ið hevur borið vitnisburð, og tað eyga, ið hevur sæð og kent aftur Harran sjálvan, í miklu dýrd og tign sínari, gjørdur út við stórleika og ræði. Sæl eru tey, ið eru nádd hjáveru Hansara. Sælur er tann maður, ið hevur leitað eftir upplýsing frá morgunstjørnuni í orði Mínum. Sælur er tann, ið hevur prýtt høvur sítt við krúnu kærleika Míns. Sælur er tann, ið hevur frætt um sorg Mína og er reistur fyri at veita Mær hjálp millum fólk Mítt. Sælur er tann, ið hevur offrað lív sítt á vegi Mínum og hevur borið margfaldar líðingar fyri Mítt navns skuld. Sælur er tann maður, ið, sannførdur um orð Mítt, frá teimum deyðu er risin upp fyri at hátíðarhalda lovprísan Mína. Sælur er tann, ið er vorðin hugfangaður av undursomu vælljóðum Mínum og hevur skrætt slørini sundur við styrkini hjá mátti Mínum. Sælur er tann, ið er vorðin verandi trúgvur móti sáttmála Mínum, og sum lutir heimsins ikki hava hildið aftur frá at náa Mítt hov av frómleika. Sælur er tann maður, ið hevur loyst seg frá øllum øðrum uttan Mær, hevur sveimað í lofthavi kærleika Míns, hevur fingið atgongd inn í kongsríki Mítt, hevur skoðað dýrdarríki Mítt, svølgt tey livandi vøtnini av gávumildi Mínum, drukkið ríviliga av teimum himmalsku áunum av kærleiksfullu forsjón Mínari, kunnað seg um søk Mína, fatað tað, sum Eg goymdi inni í skattkamari orðs Míns, og hevur geislað fram úr havsbrúgv guddómliga kunnleikans, upptikin av hálovanini og prísanini av Mær. Sanniliga, hann er av Mær. Á honum hvílir náði Mín, miskunn Mín, gávumildi Mítt og dýrd Mín.

61.

Guð, hin sanni, váttar, og opinberararnir av nøvnum og eginleikum Hansara bera vitnisburð um, at einasta ætlan Okkara við at hevja kallið og at boða frá stórbæra orði Hansara, er fyri at oyrað hjá allari skapanini, av teimum livandi vøtnunum av guddómligum framsøgnum, kann verða reinsað fyri lygisøgum og fáast í samljóð við hitt heilaga, hitt dýrdarríka og upphevjaða orðið, ið er komið úr kunnleikanáminum hjá tilevnaranum av himlunum og skaparanum av nøvnum. Sæl eru tey, ið døma við falsloysi.

O fólk jarðarinnar!

Tey fyrstu gleðistíðindi,

sum móðurbókin, í hesari størstu opinbering, hevur givið øllum fólkasløgum heimsins, er, at lógin um heilagt kríggj er tikin úr bókini. Heiðraður veri hin almiskunnsami, Harrin av ovurstórari náði, sum dyrnar av himmalskum gávumildi brustu upp við, fyri andlitunum á øllum, sum eru í himli og á jørð.

Tey næstu gleðistíðindi.

Tað er loyvt, at fólkasløg og ættir heimsins koma saman við gleði og ljóma. O fólk! Komið saman við fylgisneytunum hjá øllum trúgvum í einum anda av vinarlagi og felagskapi. Soleiðis hevur morgunstjørna fyriskipanar og myndugleika Hansara skinið omanfyri havsbrúnni av boðum Guðs, Harra alra heima.

Tey triðju gleðistíðindi

viðvíkja læruni av ymsum tungumálum. Hesi boð eru áður streymaði frá penni hins hægsta: Tað liggur á stjórnarharrum heimsins - mátti Guð hjálpt teimum - ella ráðharrum jarðarinnar, at leggja ráð saman og at góðtaka eitt av teimum verandi tungumálunum ella eitt nýtt, ið børn kring allan heim skulu læra í skúlanum, og somuleiðis eina skrift. Soleiðis fer øll jørðin at verða mett sum eittans land. Væl verður tað honum, ið gevur kalli Hansara gætur og ger tað, ið hann er biðin av Guði, Harranum yvir teirri máttmiklu trónuni.

Tey fjórðu gleðistíðindi.

Skuldi nakar av kongunum - mátti Guð stuðlað teimum - reist seg fyri at vart og hjálpt hesum kúgaða fólki, mugu øll kappast í at tæna honum og at sýna honum kærleika. Hetta hvílir á øllum. Væl er tað teimum, ið bera seg at samsvarandi hesum.

Tey fimtu gleðistíðindi.

Í hvørjum landi, har nøkur av hesum fólki búgva, mugu tey bera seg at mótvegis stjórnini í tí landinum við trúfesti, reinlyndi og sannføri. Hetta er tað, ið er opinberað eftir boðum Hansara, sum er fyriskiparin, hin fyrndargamli.

Tað er bindandi, og hvílir á fólkasløgum heimsins, hvørjum einasta teirra, at stuðla hesari týdningarmiklu søk, ið er komin úr himmalinum av viljanum hjá hinum æviga Guði, so at kanska tann fíggindaskapseldur, ið logar í hjørtunum hjá summum av fólkasløgum jarðarinnar, kann verða sløktur av teimum livandi vøtnunum av guddómligum vísdómi og við dygdini í himmalskum ráðum og eggjanum, og ljós eindarinnar og semjunnar kann skína og kasta ljóma sín á heimin.

Vit vóna, at stríðsvápnini um allan heim, av inniligu royndunum hjá slíkum, ið eru umboð fyri megi Guðs - upphevjað veri dýrd Hansara -, mega verða umskapað til endurreisingartól, og at stríð og bardagi mega verða beind burtur millum manna.

Tey sættu gleðistíðindi

er stovnanin av tí minna friðinum, sum mest upphevjaði pennur Okkara áður hevur opinberað okkurt einstakt av. Stór er sæla hansara, ið heldur honum uppi og ger eftir øllum tí, ið er fyriskipað av Guði, hinum alvitandi, hinum alvísa.

Tey sjeyndu gleðistíðindi.

Valið av klæðum og klippingin av skegginum og útsjónd tess, er latið upp í hendurnar á menniskjunum at meta um. Men ansið tykkum, O fólk, at tit ikki gera tykkum sjálvi til kastibløkur hjá teimum fákunnugu.

Tey áttandu gleðistíðindi.

Teir frómu gerningarnir hjá munkunum og prestunum millum fylgisneytar andans - við Honum veri friður Guðs - eru ikki gloymdir í hjáveru Hansara. Latið teir kortini, á hesum degi, sleppa einsemislívinum og stýra fótafetum sínum móti tí opna heiminum og takast við tað, ið fer at gagna teimum sjálvum og øðrum. Vit hava givið teimum loyvi at gifta seg, so at teir mega ala upp ein, ið fer at nevna Guð, Harra tess sædda og tess ósædda, Harran yvir teirri upphevjaðu trónuni.

Tey níggindu gleðistíðindi.

Tá ið syndarin er fullkomiliga skildur og fríaður frá øllum uttan Guði, skal hann biðja um fyrigeving og umbering frá Honum. Játtan av syndum og lógarbrotum fyri menniskjum er ikki loyvd, av tí at tað ongantíð hevur ella nakrantíð fer at stuðla upp undir guddómliga fyrigeving. Harumframt ber slík játtan fyri fólki við sær, at tú verður eyðmýktur og mannminkaður, og Guð - upphevjað veri dýrd Hansara - ynskir ikki, at tænarar Hansara verða eyðmýktir. Sanniliga er Hann hin samkennandi, hin miskunnsami. Syndarin eigur, millum seg sjálvan og Guð, at biðja inniliga um náði frá havi miskunnar, bøna um fyrigeving frá himmali gávumildis og siga:

O Guð, mín Guð! Eg biði Teg inniliga við blóðið hjá teimum, sum av sonnum elska Teg, sum vóru so hugfangaði av søtu framsøgn Tínari, at tey skundaðu sær til hámark dýrdarinnar, staðið fyri mest ærumiklu pínslaváttanini, og eg bøni Teg við teimum duldarmálum, ið liggja varðveitt í Tínum kunnleika og við teimum perlum, ið eru goymdar í gávumildishavi Tínum, um at fyrigeva mær, faðiri mínum og móðir mínari. Av teimum, ið vísa miskunn, ert Tú, av sonnum, hin mest miskunnsami. Eingin Guð er uttan Tú, hin, ið fyrigevur um ævir, hin algávumildi.

O Harri! Tú sært henda kjarna av synd venda sær til hav gávumildis Tíns, og hendan veika sóknast eftir kongsríkinum av Tínari guddómligu megi, og hendan fátæka skapning halla seg sjálvan móti morgunstjørnu ríkidømis Tíns. Við Tínari náði og Tínari miskunn, vónsvík hann ikki, O Harri, stong hann ei heldur úti frá opinberingunum av Tínum gávumildi á døgum Tínum, kasta hann ei heldur burtur frá durum Tínum, ið Tú hevur latið víða upp fyri øllum, ið dvøljast í Tínum himmali og á Tínari jørð.

Áh! Áh! Syndir mínar hava forðað mær í at nærkast hovinum av Tínum heilagleika og míni misbrot hava fingið meg at villast langt burtur frá tjaldtemplinum av hátign Tínari. Eg havi framt tað, ið Tú forbjóðaði mær at gera, og eg havi sett til viks tað, ið Tú fyriskipaði mær at halda.

Eg biði Teg inniliga við Honum, sum er hægsti Harri navna, um at skriva niður fyri meg, við penninum av Tínum gávumildi, tað, ið fer at gera meg føran fyri at nærkast Tær og fer at reinsa meg fyri misbrot míni, ið hava lagt seg ímillum meg og Tína fyrigeving og Tína náði.

Sanniliga, Tú ert tann magnandi, tann gávumildi. Eingin Guð er uttan Tú, hin máttmikli, hin miskunnsami.

Tey tíggindu gleðistíðindi.

Sum eitt tekin um náði frá Guði, opinberaranum av hesari størstu kunngerð, hava Vit tikið ta lógina úr teimum heilugu skriftunum og talvunum, ið fyriskrivar oyðileggingina av bókum.

Tey ellivtu gleðistíðindi.

Tað er loyvt at læra vísindir og listir, men slíkar vísindir, ið eru gagnligar og tæna framstigi og framgongd fólksins. Soleiðis er tað fyriskipað av Honum, sum er fyriskiparin, hin alvísi.

Tey tólvtu gleðistíðindi.

Tað er álagt hvørjum einstøkum av tykkum, at átaka sær okkurt slag av arbeiði, sum til dømis handverk, handil og tílíkt. Vit hava náðiliga upphevjað slíkt arbeiði til stigið av tilbiðjan av Guði, hinum sanna. Grundið tit í hjørtum tykkara um miskunn og vælsigning Guðs, og veitið Honum tøkk á kvøldi og á morgni. Spillið ikki burtur tíð tykkara í tómgongd og dølskni. Takist við tað, ið gagnar

tykkum sjálvum og øðrum. Soleiðis er tað fyriskipað í hesari talvu, úr hvørs havsbrúgv morgunstjørnan av vísdómi og framsøgn glæsiliga skínur.

Tey mest vanvirdu av menniskjum í eygum Guðs, eru tey, ið sita lat og bidda. Haldið tit fast í bandinum av evnisligum virðum, og setið alt álit tykkara á Guð, Hann, ið veitir tykkum øll virðir. Tá ið ein átekur sær eitt handverk ella eitt annað yrki, er slíkt arbeiði í sjálvum sær mett sum tilbiðjan eftir meting Guðs; og hetta er einki uttan eitt tekin um óendaliga og algongda gávumildi Hansara.

Tey trettandu gleðistíðindi.

Menninir í Guðs Húsi Rættvísinnar hava fingið ábyrgdina av málum fólksins. Teir eru, av sonnum, álit Guðs millum tænarar Hansara og degningar myndugleikans í londum Hansara.

O fólk Guðs! Tað, ið venur heimin upp er rættvísi, tí hann er hildin uppi av tvinnum súlum, afturløning og revsing. Hesar báðar súlurnar eru lívskelda heimsins. Av tí at hvør dagur hevur ein nýggjan trupulleika og hvør trupulleiki eina hóskiliga loysn, eiga slík mál at verða givin ráðharrunum í Húsi Rættvísinnar, so at teir mega bera seg at samsvarandi tíðarinnar tørvum og krøvum. Tey, sum, fyri sakir Guðs, reisast fyri at tæna søk Hansara, eru tey, sum skulu taka ímóti guddómligum íblástri úr tí ósædda kongsríkinum. Tað hvílir á øllum at vera lýðin mótvegis teimum. Øll ríkismál skulu gevast Húsi Rættvísinnar, men øll tilbiðjan skal fara fram sambært tí, ið Guð hevur opinberað í bók sínari.

O fólk Bahás! Tit eru støðini, har kærleiki Guðs skal lýsa í, og tit eru degningar miskunns Hansara. Dálkið ikki tungur tykkara við at háða ella biðja ilt fyri nakrari sál, og verjið eygu tykkara ímóti tí, ið ikki er sømiligt. Setið tað fram, ið tit eiga. Um tað verður væl móttikið, er mál tykkara rokkið; um ikki, so er tað nyttuleyst at mótmæla. Latið ta sálina vera og vendið tykkum til Harran, verjan, hin sjálvuppihaldandi. Verið ikki orsøk til sorg, enn minni til ósemju og stríð. Vit vóna, at tit mega fáa sanna útbúgving í lívdini av træinum av eymu miskunn Hansara, og virka í samsvari við tað, ið Guð ynskir. Tit eru øll bløðini á einum træi og droparnir í einum havi.

Tey fjúrtandu gleðistíðindi.

Tað er ikki neyðugt at fara undir serligar ferðir at vitja hvíldarstøð teirra deyðu. Um fólk við ognum og ríkidømi bjóða Húsi Rættvísinnar kostnaðin av slíkum ferðum, so hevði hetta verið kærkomið og nýtiligt í hjáveru Guðs. Sæl eru tey, ið geva fyriskipanum Hansara gætur.

Tey fimtandu gleðistíðindi.

Hóast ein tjóðveldisstjórnarskipan gagnar øllum fólkasløgum heimsins, so er hátign kongsræðisins kortini eitt av teknum Guðs. Vit ynskja ikki, at lond heimsins skulu verða verandi hetta fyriuttan. Um tey skynsomu sameina hesar báðar skipanir til eina, so fer afturløning teirra at vera stór í hjáveru Guðs.

Í undanfarnum átrúnaðum vóru slíkar fyriskipanir, sum heilagt kríggj, oyðilegging av bókum, bann fyri felagskapi og vinalagi við onnur fólk ella at lesa ávísar bøkur, ásettar og váttaðar samsvarandi tíðarinnar krøvum; men í hesari máttmiklu opinbering, í hesari týdningarmiklu kunngerð, hava margfaldu veitingar og vælvildir Guðs skuggað á øll menniskju, og úr havsbrúgv vilja Harrans, ið er um ævir, hevur lýtaleysa avgerð Hansara fyriskrivað tað, ið Vit hava sett fram omanfyri.

Vit veita Guði prís - halgaður og heiðraður veri Hann - fyri alt tað, ið Hann náðiliga hevur opinberað á hesum vælsignaða, hesum stórfingna og ósamanberiliga degi. Vissuliga, um øll á jørð vórðu útgjørd við óteljandi tungum og tey áhaldandi hálovaðu Guði og lovprísaðu navni Hansara heilt til endan, ið ikki kennir nakran enda, so hevði takkargerð teirra ikki víst seg at verið hóskandi

til bert eina einastu av teimum miskunnsomu vælvildum, ið Vit hava nevnt í hesari talvu. Um hetta vitnar hvør maður við vísdómi og skynsemi, við skili og kunnleika.

Vit bøna inniliga Guð - upphevjað veri dýrd Hansara - um at stuðla ríkisstjórum og stjórnarharrum, ið eru umboð valdsins og degningar dýrdarinnar, at fremja lógir og fyriskipanir Hansara. Hann er av sonnum hin alvaldandi, hin almáttugi, Hann, sum er vanur at svara ákallan menniskjunnar.

62.

O tú, ið hevur drukkið vínið av framsøgn Mínari úr kaliki kunnleiks Míns! Hesi stórbæru orð vórðu hoyrd í dag úr skróvanini frá guddómliga lotustræinum, ið Harri navnanna, við hondini av himmalskari megi, plantaði í tí allarhægsta paradísinum:

Hin fyrsta Taráz

og tann fyrsti glampin, ið er komin undan havsbrúgv móðurbókarinnar, er, at menniskjan eigur at kenna seg sjálva og komast við tað, ið førir til háleika ella lágleika, dýrd ella eyðmýking, ríkidømi ella armóð. Tá ið menniskjan er rokkin stiginum av fullgerð og er nádd búning sínari, hevur hon tørv á ríkidømi, og slíkt ríkidømi, ið hon útvegar sær við handverki ella øðrum yrki er rós vert og prís vert eftir meting teirra vísu, og serliga í eygunum á tænarum, ið víga seg sjálvar til útbúgving heimsins og til uppbyggingina av fólki hansara. Teir eru, av sonnum, skeinkjararnir av lívgevandi vatni kunnleikans og leiðbeinararnir til tann fullkomna vegin. Teir vegleiða fólkasløg heimsins til ta beinu gøtuna og gera tey kunnug við tað, ið stuðlar upp undir upplyfting og upphevjan menniskjunnar. Tann beina gøtan er tann, ið leiðbeinir menniskjuna til degningin av sannkenning og til staðið, har tað lýsir av degi fyri teirri sonnu fatanini, og førir hana til tað, ið fer at stuðla til dýrd, heiður og stórleika.

Vit vóna, við miskunn hins alvísa, hins alvitandi, at tað fjalandi dustið fer at verða spjatt og megin av sannkenning verður økt, at fólkið kann varnast tað endamál, sum tey vórðu skapað til. Á hesum degi er alt, ið tænir minkanini av blindleika og tænir økingini av sjónini, umhugsunarvert. Hendan sjón virkar sum umboð og leiðbeinari fyri sonnum kunnleika. Vissuliga, eftir meting teirra vísu, kemst gløgt skynsemi av gløggari sjón. Fólk Bahás mugu undir øllum umstøðum halda seg til tað, ið er hóskandi og sømiligt, og somuleiðis eggja fólki til hetta.

Tann næsta Taráz

er at koma saman við fylgissveinunum hjá øllum trúgvum í vinalags- og felagskapsanda, at kunngera tað, ið røðarin á Sinai hevur sett fram og at halda seg til ræ ttvísi í øllum málum.

Tey, ið eru klædd við falsloysi og trúfesti, eiga at koma saman við øllum fólkasløgum og ættum jarðarinnar við frøi og ljóma, av tí at samvera við fólk hevur framt og framhaldandi fer at fremja eind og semju, sum afturfyri stuðla upp undir varðveitsluna av friði í heiminum og endurreisn tjóðanna. Sæl eru slík, ið halda fast á bandi vinsemis og eymu miskunnar og eru fríaði frá fíggindskapi og hatri.

Hesin misbjóðaði eggjar fólkasløgum heimsins til at sýna tollyndi og rættvísi, ið eru tvey ljós í øllum myrkri heimsins og tveir uppalarar fyri uppbygging mannaættarinnar. Eydnurík eru tey, ið eru nádd hagar og vei teimum líkasælu.

Tann triðja Taráz

viðvíkur góðum lyndi. Eitt gott lyndi er, sanniliga, hin besti møttulin fyri menniskju frá Guði. Við honum prýðir Hann templini hjá sínum elskaðu. Við Mínum lívi! Ljósið frá einum góðum lyndi er sterkari enn sólarljósið og ljómi tess. Hvør tann, ið røkkur tí, er roknaður sum ein gimsteinur

millum manna. Dýrd og upplyfting heimsins eru treytaði av tí. Eitt prýðiligt lyndi er eini ráð, sum menniskjuni eru leiðbeind til tann beina vegin og eru førd til ta stóru kunngerðina við. Tað er gott hjá honum, ið er prýddur við frómu eginleikunum og lyndinum hjá fylkingini í tí høga.

Tað sømir seg tykkum, undir øllum umstøðum, at festa eygu tykkara á rættvísi og reinlyndi. Í hinum Loyndu Orðunum er hendan upphevjaða framsøgn opinberað av mest gøvgaða penni Okkara:

' O sonur andans! Hægst elskaði av øllum lutum í eygum Mínum er rættvísin; vend tær ikki burtur frá henni, um tú ynskir Meg, og vanrøk hana ikki, soleiðis at Eg kann líta á teg. Við hennara hjálp skalt tú síggja við tínum egnu eygum og ikki gjøgnum eygu annara, og tú skalt vita av tínum egna kunnleika og ikki gjøgnum kunnleika granna tíns. Grunda yvir hetta í hjarta tínum; hvussu tær sømir seg at vera. Sanniliga er rættvísin Mín gáva til tín og tekinið um Mína miskunn. So hav hana fyri eygum tínum.'

Tey, ið eru rættvís og rættsinnaði í sínum dómi, eru á einari høgari legu og hava eina upphevjaða støðu. Ljós frómleikans og reiðileikans skínur ljómandi frá hesum sálum. Vit vóna inniliga, at fólkasløg og lond heimsins ikki mega vera glampanum frá hesum báðum lýsandi himinknøttum fyri uttan.

## Tann fjórða Taráz

viðvíkur trúvirði. Sanniliga er tað trygdardyrnar hjá øllum, ið liva á foldum og eitt dýrdarinnar tekin frá hinum almiskunnsama. Hann, ið fær sær av tí, hevur av sonnum notið dýrgripir ríkidømis og framburðar. Trúvirði er tær størstu portursdyr, ið føra til frið og trygd fólksins. Av sonnum hevur støðugleikin í hvørjari søk verið treytaður og er treytaður av tí. Øll øki valdsins, stórleikans og ríkidømis eru upplýst av ljósi tess.

Fyri stuttari tíð síðan vórðu hesi stórbæru orð opinberaði av penni hins hægsta:

' Vit vilja nú nevna fyri tær trúvirði og støði tess eftir meting Guðs, Harra tíns, Harranum yvir hini máttmiklu trónuni. Ein dag av døgum fóru Vit til Okkara grønu oyggj. Tá ið Vit komu, sóu Vit áarløkir hennara renna, og trø hennara fruktagóð, og sólarljósið spæla sær ímillum tey. Tá Vit vendu andliti Okkara til høgru, skoðaðu Vit tað, ið pennurin ikki megnar at lýsa; ei heldur kann hann seta tað fram, ið eyga Harra mannaættarinnar sá á hasum mest halgaða, hasum mest frálíka, hasum vælsignaða og mest upphevjaða bletti. Tá ið Vit so vendu Okkum til vinstru, sóu Vit ein av fagurleikunum úr stórbærasta paradísinum standa á einari ljóssúlu og rópa hart og mæla: "O íbúgvar jarðar og himmals! Skoðið fagurleika Mín, geisling Mína, opinbering Mína, og glampa Mín. Við Guði, hinum sanna! Eg eri trúvirði og opinbering tess, og fagurleiki tess. Eg fari at løna hvørjum tí aftur, sum vil vera trúfastur ímóti Mær, og viðurkenna Mítt stig og Mína støðu, og halda fast í faldi Mínum. Eg eri hitt størsta prýðið hjá fólki Bahás, og dýrdarklæðið hjá øllum, ið eru í kongsríki skapanar. Eg eri tað avgerandi tólið fyri framgongd heimsins, og havsbrúgv vissunnar fyri allar verur." Soleiðis hava Vit sent tær tað niður, ið fer at fáa menniskjuni at nærkast Harra skapanar.'

O fólk Bahás! Trúvirði er vissuliga tað besta klæðið til tempul tykkara og tann mest ærumikla krúnan til høvur tykkara. Takið tit fast í tað eftir boðum Hansara, sum er fyriskiparin, hin ið veit alt.

## Tann fimta Taráz

viðvíkur verjuni og varðveitsluni av stigunum hjá tænarum Guðs. Ongin eigur at skúgva sannleikan til viks í nøkrum máli. Heldur eigur hann at bera fram tað, ið er rætt og satt. Fólk Bahás skulu ikki sýta nakrari sál ta afturløning, ið er hennara, skulu sýna handverkarum virðing, og, ólík fólkunum í farnum tíðum, skulu tey ikki dálka tungur sínar við skemdarorðum.

Á hesum degi skínur sól teirra, ið fáast við handaverk, omanfyri havsbrúgv vesturlanda, og úr stóra vatninum í hesum øki rennur eisini áin hjá øllum listarfólkum stríð. Talið tit við rættvísi og verið takksom fyri eina slíka gávu. Við lívi Guðs! Orðið 'Rættlæti' skínur bjart og ljómandi sum

sjálv sólin. Vit biðja Guð um náðiliga at lata ljóma tess lýsa á øll. Hann er vissuliga máttmikil yvir øllum lutum, Hann, sum er vanur at svara bønum menniskjanna.

Á hesum døgum er sannføri og falsloysi illa viðfarið í klóm lygnarinnar, og rættvísi er pínd av plágu órættvísinnar. Roykur spillunnar hevur fylt allan heimin í slíkan mun, at einki sæst í nakrari ætt uttan lið av hermonnum, og einki hoyrist úr nøkrum landi uttan glintanin frá svørðum. Vit bøna Guð, hin sanna, um at styrkja teir, ið handfara vald Hansara, í tí, sum fer at fáa heimin aftur á beint og veita tjóðunum frið.

Tann sætta Taráz.

Kunnleiki er ein av undursomu gávum Guðs. Tað hvílir á øllum at útvega sær hann. Slíkar listir og slík evnisbundin ráð, ið nú eru sjónlig, eru komin fram við hjálpini frá Hansara kunnleika og vísdómi, ið eru opinberaði í epistlum og talvum av Hansara mest upphevjaða penni - ein pennur úr hvørs skattkamari perlur av vísdómi og framsøgnum, og listir og handverk heimsins eru fingin í ljósmála.

Á hesum degi eru loyndarmál jarðarinnar avdúkaði fyri eygum menniskjunnar. Síðurnar í tíðindabløðunum, sum koma út so títt, eru vissuliga spegl heimsins. Tær endurspegla verkini og stundanina hjá ymsum fólkasløgum og ættum. Tær bæði endurspegla tey og gera tey kend. Tær eru eitt spegl, ið er gjørt út við hoyrn, sjón og talu. Hetta er eitt undursamt og árinamikið fyribrigdi. Tað sømir seg kortini teimum, ið skriva tær, at vera reinsað frá eggjanunum av teirra óndu tráanum og girndum, og at vera klædd í búna rættvísinnar og rættlætis. Tey eiga at rannsaka so nógv sum gjørligt og staðfesta sannroyndirnar, og síðani festa tær á blað.

63.

Í hesum døgum hvílir tað á øllum, at halda fast við eind og semju, og at arbeiða íðin við at fremja søk Guðs, so at kanska tær treisku sálirnar mega náa tað, ið fer at bera varandi eydnu við sær.

Í stuttum hava tvídráttir millum ymsar trúarflokkar latið upp vegin til veikleika. Hvør trúarflokkur hevur hildið sína egnu leið, og krøkir seg fastan í okkurt ávíst tog. Hóast eyðsýndan blindleika og fákunnu erpa teir sær kortini av innliti og kunnleika sínum. Millum teirra eru dulspekingar, ið eru trúgvir mótvegis Islam, og summir teirra eru upptiknir av tí, sum førir til leti og avbyrging. Eg svørji við Guð! Tað lækkar stig menniskjunnar og fær hana at bólgna av errinskapi. Menniskjan má bera ávøkstur. Ein, ið ikki ber ávøkstur, er, eftir orðum andans, líkur einum fruktaleysum træi, og eitt fruktaleyst træ hóskar bert til eldin.

64.

O fólk Guðs! Eg áminni tykkum um at sýna kurteisi. Tí omanfyri alt annað er tað kongssonur dygdanna. Væl verður tað honum, ið er upplýstur av ljósi kurteisis og er prýddur við klæði reiðileikans. Hvør tann, ið eigur kurteisi, er við vissu rokkin einum stórbærum stigi. Vit vóna, at hesin misbjóðaði og øll onnur mega verða gjørd før fyri at ogna sær tað, halda fast við tað, liva eftir tí, og festa eygu okkara á tað. Hesi eru eini bindandi boð, ið eru streymaði frá penninum hjá hinum størsta navninum.

65.

O fólk Guðs! Á hesum degi eiga øll at líta at havsbrúnni í hesum vælsignaðu orðum: 'Einsamallur og uttan nakra hjálp ger Hann alt tað, sum Honum hóvar'. Hvør tann, ið røkkur hesum stigi er sanniliga komin at ljósinum av sonnu eind Guðs og er vorðin upplýstur av henni, meðan øll onnur í

bók Guðs eru tald millum teirra, ið fylgja innantómum heilaspuna og fáfongdum ímyndum. Lurtið eftir røddini hjá hesum misbjóðaða og verjið heiðurin í stigi tykkara. Tað er sera umráðandi og bráðneyðugt, at øll geva hesum máli gætur.

Uttan nakað slør og óduldur hevur hesin misbjóðaði altíð kunngjørt fyri andlitunum á øllum fólkasløgum heimsins, tað, ið fer at vera lykilin at lata dyr vísindanna upp við, og listanna, kunnleikans, vælverunnar, framgongdar og ríkidømis. Teir órættir, ið kúgararnir hava veitt Okkum, hava ikki megnað, at fáa gellandi røddina hjá hinum mest upphevjaða penninum at tiga. Ei heldur hevur ivin hjá teimum treisku ella teimum uppreistrarhugaðu verið førur fyri at forða Honum í at opinbera hitt stórbærasta orðið. Eg bøni inniliga Guð um, at Hann kann verja og reinsa fólk Bahás fyri tann innantóma heilaspuna og tær spiltu hugmyndir hjá teimum, ið fylgja hini undanfarnu trúnni.

O fólk Guðs! Teir rættvísu lærdu, ið víga seg sjálvar til vegleiðingina av øðrum og eru fríaðir og væl vardir frá teski og tutli hjá eini vesala og brelnari natúr, eru í eygum Hansara, sum er tráan heimsins, stjørnur á himmalinum av sonnum kunnleika. Tað er avgjørt neyðugt, at sýna teimum virðing. Teir eru av sonnum lækjur við mjúkt floymandi vatni, stjørnur, ið skína bjart, fruktir av hinum vælsignaða træinum, fyridømi fyri himmalskum valdi, og høv av himmalskum vísdómi. Sælur er tann, ið fylgir teimum. Sanniliga er ein slík sál í bók Guðs, Harranum yvir hini máttmiklu trónuni, roknað millum teirra, sum tað fer at gangast væl.

66.

Tú sært meg, O Guð mín, ringja meg saman av pínu í dustinum, eins og ein fiskur. Bjarga mær, hav miskunn við mær, O Tú hvørs stuðul er vorðin ákallaður av øllum menniskjum, O Tú í hvørs hondum teymar valdsins yvir øllum monnum og kvinnum liggur. Hvørja ferð eg hugsi um míni ringu lýti og míni stóru misbrot, søkir vónloysi at mær úr øllum ættum, og hvørja ferð eg steðgi á at grunda yvir havið av stórtøkni Tínum og himmalin av miskunn Tíni og morgunstjørnuna av eyma samhuga Tínum, andi eg í meg angan av vón úr høgru og vinstru, úr norðuri og suðuri, eins og gevur hvør skaptur lutur mær tey gleðiligu tíðindi, at skýggini á náðihimmali Tínum fara at oysa regn teirra niður yvir meg. Við mátti Tínum, O Tú, sum ert grundstuðul teirra falsleysu og trá teirra, ið hava tætt samband við Teg! Tínar margfaldu vælvildir og Tíni vælsignilsi, og opinberingarnar av Tínari náði og miskunn hava sanniliga veitt mær dirvi. Hvussu kann berur einkisleiki annars lovprísa navni Hansara, sum, við einum orði, hevur veitt skapanini lív, og hvussu kann ein hjánandi skapningur hevja Hann til skýggja, sum hevur prógvað, at eingi orð nakrantíð kunnu lýsa Hann og einki lovorð prísa dýrd Hansara? Hann hevur um ævir verið ómetaliga hevjaður upp um fatanina hjá skapningum sínum og halgaður frá hugmyndunum hjá tænarum sínum.

O Harri! Tú sært hendan lívleysa fyri andliti Tínum; lat hann ikki, við hásinni Títt og gávumildu vælvild Tína, vera uttan kalik ódeyðiliga lívsins. Og Tú sært hendan pínda standa fyri trónu Tínari; vís honum ikki burtur frá grøðingarhavi Tínum. Eg biði Teg inniliga um, at gera meg føran fyri, altíð og undir øllum umstøðum, at minnast til Tín, at lovprísa navni Tínum og at tæna søk Tínari, hóast eg fullvæl eri greiður yvir, at einki, sum kemur frá einum tænara, kann fara út um avmarkingarnar hjá sál hansara, ei heldur søma seg ræði Tínum, ei heldur vera vert dýrdarhovi Tínum og Tíni hátign.

Máttur Tín ber mær vitnisburð! Um tað ikki var til tess at hálova Tær, hevði tunga mín ikki verið mær til gagns, og um tað ikki var fyri at tæna Tær, hevði tilvera mín verið til fánýtis. Um eg ikki skuldi fingið gleðina at skoða ljóman frá dýrdarríki Tínum, hví skuldi eg tá virðismett sjón? Og um eg ei skuldi kent fragdina av at lurta eftir yndisligu rødd Tínari, til hvørja nyttu er hoyrn?

Tann fyrsta Ishráq.

Tá ið morgunstjørna vísdómsins reis omanfyri havsbrúnni av heilagu trúarskipan Guðs, kom hon við hesari glæsiligu framsøgn: Tey, ið eiga ríkidømi og hava myndugleika og vald, mugu sýna ta inniligastu virðing fyri átrúnaði. Átrúnaður er vissuliga eitt geislandi ljós og ein óvinnandi skansi fyri verjuni og vælferðini hjá fólkasløgum heimsins, tí ótti fyri Guði noyðir menniskjuna til at halda fast við tað, ið er gott, og at skýggja hitt ónda. Um lampa átrúnaðins verður fjald, fara ruðuleiki og óskil at kykna, og ljósið av falsloysi og rættvísi, rógv og friði fer at halda uppat at skína. Um hetta vil hvør maður við veruligari fatan bera vitnisburð.

Tann næsta Ishráq.

Vit hava álagt allari mannaættini, at skipa tann minna friðin - tað tryggasta av øllum ráðum til tess at verja mannaættina. Stjórnarharrar heimsins eiga, allir sum ein, at halda fast við hetta, tí hetta er tað avgerandi tólið, ið kann veita vissu fyri trygdini og vælferðini hjá øllum fólkasløgum og tjóðum. Teir eru, sanniliga, birtingarnar av valdi Guðs og degningarnir fyri myndugleika Hansara. Vit bøna hin almáttuga um, at Hann náðiliga kann stuðla teimum í tí, sum stuðlar upp undir vælveruna hjá tegnum teirra. Ein fullfíggjað frágreiðing viðvíkjandi hesum máli er áður sett fram av penni dýrdarinnar; væl verður tað teimum, ið bera seg at samsvarandi hesum.

Tann triðja Ishráq.

Tað hvílir á øllum at halda tey heilugu boð Guðs, av tí at tey eru lívskelda heimsins. Himmal guddómliga vísdómsins er upplýstur av teimum báðum lýsandi himinknøttunum av samráðing og samhuga, og trónuhimmal heimsskipanar er hildin uppi av teimum báðum súlunum av afturløning og revsing.

Tann fjórða Ishráq.

Í hesari opinbering eru tað herskararnir av rós verdum gerðum og falsleysum lyndi, ið eru teir herskarar, ið kunnu veita henni sigurin. Leiðarin og ovastin hjá hesum herskarum hevur altíð verið óttin fyri Guði, ið fevnir um allar lutir og ræður yvir øllum lutum.

Tann fimta Ishráq.

Stjórnir eiga at kunna seg fullkomiliga við umstøðurnar hjá teimum, ið tær stjórna, og veita teimum sæti eftir tí, sum tey hava uppiborið. Tað er álagt hvørjum ríkisstjóra og valdsharra, at hugsa um hetta mál við størsta varsemi, so at svíkjarin ikki tekur sær sæti hins trúfasta, ella ránsmaðurin stjórnar í staðin fyri hin trúverda. Millum teir embætismenn, ið áður hava stýrt í hesum størsta fongsli vóru nakrir, Guð veri lovaður, prýddir við rættvísi, men hvat viðvíkur øðrum, so leita Vit Okkum friðskjól hjá Guði. Vit bøna hin Eina sanna Guð um, at leiðbeina teir allar, so at kanska teir ikki mega vera uttan frukt trúarinnar og trúvirðis, ella vera hildnir aftur frá ljósinum av rættlæti og rættvísi.

Tann sætta Ishráq

er sameining og semja millum børn manna. Frá tíðarinnar byrjan hevur ljós eindarinnar kastað guddómliga glampa sín á heimin, og bestu ráðini at fáa hesa eind á føtur, er, at fólkasløg heimsins skilja skriftina og taluna hjá hvørjum øðrum. Í epistlum, Vit áður hava skrivað, hava Vit álagt stýrislimunum í Húsi Rættvísinnar antin at velja eitt av teimum tungumálum, ið nú eru til, ella at góðtaka eitt nýtt mál, og á sama hátt velja eina felags skrift, og hesi eiga bæði at verða lærd í øllum skúlum heimsins. Soleiðis fer jørðin at verða mett sum eittans land og eittans heim. Tann mest stórfingna fruktin av træi kunnleikans er hetta upphevjaða orð: Av einum træi eru tit øll fruktirnar,

og á einari grein bløðini. Lat ongan rósa sær av hesum, at hann elskar land sítt. Lat hann heldur rósa sær av hesum, at hann elskar ætt sína. Viðvíkjandi hesum hava Vit áður opinberað tað, ið eru ráðini til uppbygging heimsins og eind tjóðanna. Sæl eru tey, ið røkka hesum. Sæl eru tey, ið bera seg at samsvarandi hesum.

Tann sjeynda Ishráq.

Pennur dýrdarinnar veitir øllum ráð viðvíkjandi vegleiðingini og frálæruni av børnum. Gevið tí gætur, ið vilji Guðs opinberaði, tá ið Vit komu til fongsulsbýin og skrivaðu niður í ta Heilagastu Bókina. Hvørjum faðiri er álagt, at læra son sín og dóttir sína kynstrið at lesa og skriva, og alt tað, sum er fyriskipað í heilagu talvuni. Um ein maður leggur tað til viks, ið honum er álagt, fara stýrislimirnir, um hann er múgvandi, at taka tað frá honum, ið krevst til frálæru barnanna, og um ikki, so lutast hetta Húsi Rættvísinnar. Vit hava sanniliga gjørt tað til eitt skjól hjá teimum fátøku og neyðstøddu. Um ein fostrar upp sín egna son ella sonin hjá einum øðrum, so er tað sum hevur hann fostrað ein av Mínum synum upp; á honum hvílir dýrd Mín, miskunn Mín, náði Mín, ið hava fevnt um heimin.

Tann áttanda Ishráq.

Hetta brot, ið nú verður skrivað av penni dýrdarinnar, er roknað sum partur av hini Heilagastu Bókini: Menninir í Guðs Rættvísinnarhúsi hava fingið ábyrgdina av málum fólksins. Teir eru, av sonnum, álit Guðs millum tænarar Hansara og degningar myndugleikans í londum Hansara.

O fólk Guðs! Tað, ið venur heimin upp er rættvísi, tí hann er hildin uppi av tvinnanda súlum; afturløning og revsing. Hesar báðar súlurnar eru lívskelda heimsins. Av tí at hvør dagur hevur ein nýggjan trupulleika og hvør trupulleiki eina hóskiliga loysn, eiga slík mál at verða givin ráðharrum Húsi Rættvísinnar, so at teir mega bera seg at á ein hátt, sum samsvarar við tíðarinnar tørvir og krøv. Tey, sum fyri sakir Guðs reisast at tæna søk Hansara, eru tey, sum taka ímóti guddómligum íblástri úr ósædda kongsríkinum. Tað hvílir á øllum at vera lýðin mótvegis teimum. Øll ríkismál skulu gevast Húsi Rættvísinnar, men øll tilbiðjan skal fara fram sambært tí, ið Guð hevur opinberað í bók sínari.

O fólk Bahás! Tit eru støðini, har tað lýsir av degi fyri kærleika Guðs, og degningarnir fyri miskunn Hansara. Dálkið ikki tungur tykkara við at háða ella biðja ilt fyri nakrari sál, og verjið eygu tykkara ímóti tí, ið ikki er sømiligt. Setið tað fram, ið tit eiga. Um tað verður væl móttikið, er mál tykkara rokkið; um ikki, so er tað nyttuleyst at mótmæla. Latið hasa sálina til sín sjálvs og vendið tykkum til Harran, verjan, hin sjálvuppihaldandi. Verið ikki orsøk til sorg, enn minni til ósemju og stríð. Vit vóna, at tit mega fáa sanna útbúgving í lívdini av træinum av eymu miskunn Hansara, og virka í samsvari við tað, ið Guð ynskir. Tit eru øll bløðini á einum træi og dropparnir í einum havi.

Tann nígginda Ishráq.

Ætlanin við átrúnaði, soleiðis sum hann er opinberaður úr himmalinum av Guðs heilaga vilja, er, at fáa í lag eind og semju millum fólkasløg heimsins; gerið hann ikki til orsøk til tvídrátt og stríð. Átrúnaður Guðs og guddómliga lóg Hansara eru tey mest máttugu tólini og tey tryggastu av øllum ráðum fyri framkomuni av ljósi eindarinnar millum manna. Framgongd heimsins, menning tjóðanna, rógv fólksins, og friðurin hjá øllum, ið dvøljast á foldum, eru millum meginreglur og fyriskipanir Guðs. Átrúnaðurin veitir menniskjuni ta dýrabarastu av øllum gávum, ber fram bikarið av eydnu, tillutar ævigt lív, og letur ómetaligar góðgerðir regna niður á mannaættina. Tað sømir seg leiðarum og ríkisstjórum heimsins, og serstakliga stýrislimunum í Guðs Húsi Rættvísinnar, at royna

alt tað, ið teir eru mentir, at verja støðu hansara, fremja áhugamál hansara og hevja stig hansara í eygum heimsins. Á sama hátt hvílir tað á teimum, at kanna umstøðurnar hjá tegnum sínum og at kunna seg sjálvar við málini og virksemið hjá teimum ymsu samfeløgunum í ríkjum sínum. Vit heita á birtingarnar av valdi Guðs - valdsharrar og ríkisstjórar jarðarinnar - um at ressast og gera alt tað teir eru mentir, so at teir mega reka burtur ósemju úr hesum heimi og upplýsa hann við ljósi semjunnar.

68.

O fólkasløg heimsins! Avnoktið allan óndskap, haldið fast við tað, ið er gott. Strembið eftir at vera skínandi fyridømi fyri allari mannaættini, og sannir áminnarar um dygdir Guðs millum manna. Hann, ið reisir seg at tæna søk Mínari, eigur at vísa fram Mín vísdóm, og leggja alla orku í at reka burtur fákunnu av jørðini. Verið sameind í ráðlegging, verið eitt í hugsan. Latið hvønn morgun vera betri enn kvøld hansara, og hvønn morgindag ríkari enn gjárdag hansara. Heiður menniskjunnar liggur í tænastu og dygd og ikki í skreytum og skrúðum ríkidømis og ognar. Ansið eftir, at orð tykkara verða reinsaði fyri innantóman heilaspuna og verðsligar tráanir, og gerðir tykkara verða reinsaðar fyri snildir og illgruna. Spillið ikki burtur ríkidømið í tykkara dýrabæru lívum í eltingini av óndum og spiltum alski, latið ei heldur strembanir tykkara verða brúktar til at fremja tykkara egnu áhugamál. Verið gávumild í tíð tykkara av yvirflóð, og tolin, tá ið tit onki hava. Í kjalarvørri mótburðar kemur framgongd, og gleði fylgir sorg. Verjið tykkum ímóti tómgongd og dølskni, og haldið fast við tað, ið gagnar mannaættini, hvørt tit eru ung ella gomul, høg ella lág. Ansið tykkum, at tit ikki sáa ósemjukrøkjur millum menniskju ella planta tornir av iva í rein og geislandi hjørtu.

O tit elskaðu Harrans! Fremjið ikki tað, ið dálkar klára áarløk kærleikans ella oyðileggur søta anga vinalagsins. Við rættvísi Harrans! Tit vórðu skapaði til at sýna hvørjum øðrum kærleika, og ikki ólíkindi og hatur. Leggið ikki æruna á kærleika til tykkum sjálvi, men á kærleika til medmenniskju tykkara. Verið ikki errin av kærleika til land tykkara, men av kærleika til alla mannaættina. Latið eyga tykkara vera reint, hond tykkara trúfasta, tungu tykkara sannføra og hjarta tykkara upplýst. Eyðmýkið ikki støði teirra lærdu í Bahá og lítilsvirðið ikki stigið hjá slíkum ríkisstjórum, ið standa fyri rættvísi tykkara millum. Setið álit tykkara á her rættvísinnar, latið tykkum í brynju vísdómsins, latið prýði tykkara vera fyrigeving og náði og tað, ið stimbrar hjørtu teirra, ið Guð hevur tokka til.

69.

*Í navni Guðs, hins upphevjaða, hins hægsta.*

Keldan til alt gott er álit á Guð, lýdni móti boðum Hansara og nøgdsemi við Hansara heilaga vilja og tokka.

Kjarni vísdómsins er óttin fyri Guði, ræðslan fyri plágu og revsing Hansara, og fatanin av rættvísi og fyriskipanum Hansara.

Kjarni átrúnaðins er at vitna um tað, ið Harrin hevur opinberað, og fylgja tí, ið Hann hevur fyriskipað í máttmiklu bók sínari.

Keldan til alla dýrd er at taka ímóti øllum tí, ið Harrin hevur veitt, og at vera nøgdur við tað, ið Guð hevur fyriskipað.

Kjarni kærleikans er at menniskjan vendir hjarta sínum móti hinum elskaða, og slítir seg leysa frá øllum uttan Honum, og ongum tráar eftir uttan tí, ið er tráan Harra hennara.

Tað sanna minnið er at nevna Harran, hin allovaða, og at gloyma alt annað uttan Hann.

Satt álit er at tænarin fylgir yrki og kalli sínum í hesum heimi, heldur fast við Harran, ikki sóknast eftir nøkrum uttan miskunn Hansara, av tí at lagnan hjá øllum tænarum Hansara er í Hansara hond.

Kjarni óbundinleikans er at menniskjan vendir andliti sínum móti hovi Harrans, trínur inn í hjáveru Hansara, skoðar ásjón Hansara, og stendur sum vitni frammanfyri Honum.

Kjarni fatanar er at vitna um sína fátækt, og at vera undirgivin vilja Harrans, hins ovasta, hins miskunnsama, hins almáttmikla.

Keldan til dirvi og megi er at virka fyri orði Guðs, og trúfesti í kærleika Hansara.

Kjarni vælgerðar er, at tænarin sigur frá vælsignilsi Harra síns, og veitir Honum tøkk allar tíðir og undir øllum umstøðum.

Kjarnin í trúgv eru fá orð og yvirflóð av gerðum; vitið, at honum, ið eigur størri orð enn gerðir, er deyðin sanniliga betri enn lívið.

Kjarnin í sannari trygd er at tiga, at hyggja at endanum á øllum lutum og at avnokta heimin.

Byrjanin av hásinni er, tá ið menniskjan nýtir ríkidømi sítt til seg sjálva, ætt sína, og teir fátøku millum sínar brøður í trúnni.

Kjarni ríkidømis er kærleiki til Mín; hvør tann, ið elskar Meg er ánarin av øllum lutum, og tann, ið ikki elskar Meg er vissuliga taldur millum tey fátøku og neyðstøddu. Hetta er tað, ið fingur dýrdarinnar og ljómans hevur opinberað.

Keldan til allan óndskap er, tá ið menniskjan vendir sær burtur frá Harra sínum og er altrá eftir tí, ið ikki hoyrir Guði til.

Tann mest brennandi eldurin er, at ivast í teknum Guðs, at trætast innantómt ímóti tí, ið Hann hevur opinberað, at avnokta Hann og taka sjálvan seg fram um Hann, í errinskapi.

Keldan til allan lærdóm er kunnleikin um Guð, upphevjað veri dýrd Hansara, og ikki røkkur tú hesum uttan gjøgnum kunnleikan um guddómligu birting Hansara.

Kjarni eyðmýkinganna er at fara út úr skugga hins miskunnsama og søkja skjól hins ónda.

Keldan til villu er, at ikki trúgva á hin eina sanna Guð, at seta álit sítt á nakað annað uttan Hann, og flýggja frá boðum Hansara.

Sannur missur er sum hjá honum, hvørs dagar eru gingnir í fullkomnari fákunnu um sjálvan seg.

Kjarnin í øllum tí, sum Vit hava opinberað tær, er rættvísi, at menniskjan fríar seg sjálva frá innantómum heilaspuna og herming, sær við eyga einleikans glæsiliga handverk Hansara, og rannsakar allar lutir við einum leitandi eyga.

Soleiðis hava Vit vegleitt teg, gjørt vísdómsorð sjónlig fyri tær, so at tú kanst vera Harranum takksamur, Guði tínum, og vera errin av hesum millum øll fólkasløg.

70.

Eingin vísur maður kann prógva kunnleika sín uttan við orðum. Hetta vísir týdningin av orðinum, soleiðis sum tað er váttað í øllum skriftunum, bæði úr forðum og meira nýliga. Tí tað er við styrki tess og upplívandi anda, at fólk heimsins eru nádd eina so høga støðu. Harumframt eiga orð og framsøgn at vera bæði árinamikil og gjøgnumtreingjandi. Einki orð fær kortini hesar báðar eginleikar um tað ikki verður borið fram fullkomiliga fyri sakir Guðs og við hóskandi fyriliti til krøv høvisins og fólksins.

Hin stóra veran sigur: Mannatala er ein kjarni, ið stundar eftir at útinna sína ávirkan og hevur tørv á hóvsemi. Hvat viðvíkur ávirkan hennara, so er hendan treytað av hugvitssemi, sum afturfyri er treytað av hjørtum, ið eru óbundin og rein. Hvat viðvíkur hóvsemi, so má hetta vera bundið saman við siðsemi og vísdómi, sum tað er fyriskrivað í teimum heilugu skriftunum og talvunum.

Hvørt orð er útgjørt við einum anda, tess vegna eigur talarin ella tann, ið ber fram, at bera fram orð síni varisliga í røttu løtu og á rætta stað, tí tann ávirkan, ið hvørt orð hevur, er týðilig og

eyðsædd. Hin stóra veran sigur: Eitt orð kann líknast við eld, eitt annað við ljós, og ávirkanin, ið bæði bera við sær er sjónlig í heiminum. Tískil eigur ein upplýstur maður við vísdómi fyrst og fremst at tosa við orðum, ið eru eins mild og mjólk, so at mannabørnini mega fáast at vaksa og verða uppalin av teimum og mega náa hægsta mál mannatilverunnar, ið er støði teirra sonnu fatanar og hásinnis. Og somuleiðis sigur Hann: Eitt orð er líkt várinum, ið fær tey ungu trøini í rósugarði kunnleikans at grønkast og blóma, meðan eitt annað orð er eins og drepandi eitur. Tað sømir seg einum skynsomum manni at tosa við allarstørsta mildi og várkunn, so at søtleikin í orðum hansara kann elva øllum til at røkka tí, ið hóskar til støðu menniskjans.

71.

Hvar er hann, ið kann hjálpa Mær og verja Meg ímóti svørðunum hjá hesum trúleysu sálum? Hvar er tann maður við innliti, ið fer at skoða orð Guðs við sínum egnu eygum, og sleppa sær av við áskoðanirnar og uppfatanirnar hjá fólkasløgum jarðarinnar?

O tænari! Ávara tú tænarar Guðs um ikki at vísa tí aftur, ið teir ikki fata. Sig, bønið Guð um at lata upp fyri hjørtum tykkara portrini fyri sannari fatan, so at tit mega vera ávaraði um tað, ið eingin er ávaraður um. Hann er, sanniliga, gevarin, hin fyrigevandi, hin samkennandi.

72.

Tær halgaðu sálirnar eiga í hjørtum sínum at grunda yvir og hugsa djúpt um hættirnar at læra frá sær. Úr tekstunum í teimum undursomu, himmalsku skriftunum eiga tey at læra seg orðafelli og brot uttanat, ið viðvíkja ymiskum dømum, so at tey, ímeðan tey tosa, mega siga fram heilug ørindi, tá ið høvið krevur tað, av tí at hesi heilugu ørindi eru tann sterkasti heilsudrykkurin, tann mætasti og máttmiklasti eydnuluturin. So sterk er teirra ávirkan, at tann, sum hoyrir, ikki fær nakra orsøk til støðuloysi. Eg svørji við lívi Mínum! Hendan opinbering er útgjørd við slíkari megi, at hon fer at virka sum leiðarsteinurin hjá øllum tjóðum og ættum jarðarinnar. Um ein steðgaði á fyri at hugsa seg væl um, so hevði honum gjørst greitt, at einki stað er, ella kann vera, hjá nøkrum at flýggja til.

73.

Sig: O fylking ríkisstjóranna og teirra lærdu og teirra vísu! Hin fyrijáttaði dagurin er komin og Harri herskaranna er komin fram. Fegnist tit við stórari gleði vegna hesa størstu eydnu. Stuðlið Honum tá við megi vísdómsins og framsagnar. Soleiðis áleggur Hann tykkum, sum altíð hevur kunngjørt, 'Sanniliga, tað er eingin Guð uttan Eg, hin alvitandi, hin alvísi.'

Mátti dýrd Hansara hvílt á tær og á teimum, ið eru saman við tær, og á slíkum, ið virðismeta teg og lurta eftir teimum orðum, sum tú mælir í lovprísan av hesari máttmiklu, hesari dularfullu opinbering.

74.

Menniskjan er lík einum træi. Um hon er prýdd við frukt, so hevur hon verið, og fer altíð at vera, verd rósi og viðmæli. Annars hóskar eitt fruktaleyst træ bert til eldin. Fruktirnar av mannatrænum eru framúrskarandi, nógv ynsktar og inniliga elskaðar. Millum teirra eru reiðiligt lyndi, rættlætar gerðir og ein prýðilig framsøgn. Várið hjá teimum jarðligu trøunum kemur fyri einaferð um árið, meðan tað hjá mannatrøunum kemur fyri á døgum Guðs - upphevjað veri dýrd Hansara. Um trø mannalívsins, í hesari guddómligu vártíð, vórðu prýdd við teimum fruktum, ið eru nevndar, so hevði ljómin frá ljósi rættvísinnar, við vissu, upplýst øll tey, ið dvøljast á foldum, og øll høvdu livað

í rógv og nøgdsemi undir lívandi skugga Hansara, sum er miðið hjá mannaættini allari. Vatnið til hesi trø er tað livandi vatnið av heilagum orðum, ið eru framborin av hinum, ið heimurin elskar. Eftir eini løtu eru slík trø plantaði, og í næstu løtu fara greinar teirra, orsakað av ælunum av guddómligari miskunn, at røkka himmalinum. Eitt uppturkað træ hevur kortini ongantíð verið, ella fer at vera, vert at verða nevnt.

Sælur er tann trúfasti, ið er prýddur við klæðinum av miklari stremban, og hevur reist seg fyri at tæna hesari søk. Ein slík sál er sanniliga rokkin tí ynskta málinum og hevur skilt tað miðið, ið hon varð skapað fyri. Men óteljandi suff til tey treisku, ið eru eins og uppturkaði bløð, ið liggja á dustinum. Áðrenn langt er umliðið fara týnandi hvirlur at bera tey burtur til tað stað, ið er ásett teimum. Fákunnug komu tey, fákunnug dvøldu tey og fákunnug vendu tey aftur til bústaðir sínar.

Heimurin kunnger áhaldandi hesi orð: Ansið tykkum, eg eri stokkutur, og tað eru míni útvortis fyribrigdi og mínir litir eisini. Ansið tit eftir broytingum og tilvildum, ið eru hugsaðar upp innan í mær og verið tit vakt úr dúri tykkara. Men kortini er tað einki síggjandi eyga til at síggja, ei heldur nakað hoyrandi oyra til at lurta.

Brotini í hesari bók eru upprunaliga úr bókunum "Bahá'u'lláh: *Gleanings from the Writings of Bahá'u'lláh*", sum Bahá'i Publishing Trust gav út í 1976, og úr "Bahá'u'llah: *Tablets of Bahá'u'lláh revealed after the Kitáb-i-Aqdas*", sum Bahá'i World Center gav út í 1982.

1. Gleanings, kap. II, s. 5
2. Gleanings, kap. III, s. 5-6
3. Gleanings, kap. IV, s. 6-7
4. Gleanings, kap. V, s. 7-9
5. Gleanings, kap. X, s. 12-14
6. Gleanings, kap. XIII, s. 17
7. Gleanings, kap. XXIII, s. 56-59
8. Gleanings, kap. XXIV, s. 59
9. Gleanings, kap. XXVII, s. 64-65
10. Gleanings, kap. XXXI, s. 74
11. Gleanings, kap. XXXII, s. 75-76
12. Gleanings, kap. XXXIV, s. 79-80
13. Gleanings, kap. XXXVI, s. 85-86
14. Gleanings, kap. XXXVIII, s. 87-88
15. Gleanings, kap. XLIII, s. 96-97
16. Gleanings, kap. XLVI, s. 99-100
17. Gleanings, kap. XLVII, s. 100-101
18. Gleanings, kap. LI, s. 103-104
19. Gleanings, kap. LIV, s. 108
20. Gleanings, kap. LIX, s. 115-116
21. Gleanings, kap. LXI, s. 118
22. Gleanings, kap. LXVI, s. 126-130
23. Gleanings, kap. LXX, s. 135-136
24. Gleanings, kap. LXXI, s. 136-138
25. Gleanings, kap. LXXII, s. 138-140
26. Gleanings, kap. LXXV, s. 142-143
27. Gleanings, kap. LXXVIII, s. 149-151
28. Gleanings, kap. LXXIX, s. 151-152

29. Gleanings, kap. LXXX, s. 152-155
30. Gleanings, kap. LXXXI, s. 155-158
31. Gleanings, kap. LXXXII, s. 158-163
32. Gleanings, kap. LXXXVI, s. 169-171
33. Gleanings, kap. XCII, s. 182-183
34. Gleanings, kap. XCV, s. 193-195
35. Gleanings, kap. XCVIII, s. 197-199
36. Gleanings, kap. C, s. 201-202
37. Gleanings, kap. CI, s. 205
38. Gleanings, kap. CII, s. 205-206
39. Gleanings, kap. CIV, s. 209
40. Gleanings, kap. CVI, s. 212-213
41. Gleanings, kap. CVII, s. 213
42. Gleanings, kap. CVIII, s. 213
43. Gleanings, kap. CX, s. 214-216
44. Gleanings, kap. CXII, s. 217-218
45. Gleanings, kap. CXVI, s. 245-246
46. Gleanings, kap. CXVII, s. 248-249
47. Gleanings, kap. CXIX, s. 252-253
48. Gleanings, kap. CXX, s. 253-254
49. Gleanings, kap. CXXV, s. 263-265
50. Gleanings, kap. CXXVIII, s. 277-278
51. Gleanings, kap. CXXX, s. 284
52. Gleanings, kap. CXXXIV, s. 289
53. Gleanings, kap. CXXXIX, s. 303-304
54. Gleanings, kap. CXLV, s. 313-314
55. Gleanings, kap. CXLVI, s. 314-315
56. Gleanings, kap. CL, s. 318
57. Gleanings, kap. CLVII, s. 333-334
58. Gleanings, kap. CLIX, s. 334-335
59. Gleanings, kap. CLXV, s. 345
60. Tablets, s. 16-17
61. Tablets, s. 21-29
62. Tablets, s. 34-40
63. Tablets, s. 60
64. Tablets, s. 88
65. Tablets, s. 96-97
66. Tablets, s. 112-113
67. Tablets, s. 125-130
68. Tablets, s. 138-139
69. Tablets, s. 155-157
70. Tablets, s. 172-173
71. Tablets, s. 188
72. Tablets, s. 200
73. Tablets, s. 239-240
74. Tablets, s. 257-258